LØGTINGSINS UMBOÐSMAÐUR

Tórshavn, tann 27. oktober 2023
J.nr.: LUM-23/07090

# Frágreiðing

um

viðgerð av málum um alment innlit
í størru kommununum

undir Bryggjubakka 11 • Postrúm 2008 • FO-110 Tórshavn • Tlf. 358500 • Faks 358501 • lum@lum.fo • www.lum.fo

# Innihaldsyvirlit


1 Inngangur ....3
2 Samandráttur ....5
3 Um reglurnar í innlitslógini ....8
4 Kunngerð nr. 198 frá 15. desember 1993 um gjald fyri avrit og fotoavrit ....12
5 Mál um innlit, viðgjørd av kommunum, og viðmerkingar umboðsmansins ....16
  5.1 Tórshavnar kommuna ....16
  5.2 Klaksvíkar kommuna ....22
  5.3 Runavíkar kommuna ....28
  5.4 Eysturkommuna ....35
  5.5 Vága kommuna ....40
  5.6 Sunda kommuna ....45
  5.7 Tvøroyrar kommuna ....51
  5.8 Fuglafjarðar kommuna ....58
  5.9 Nes kommuna ....63

# 1 Inngangur

Við skrivi, dagfest 15. mars 2023, boðaði eg Tórshavnar kommunu, Klaksvíkar kommunu, Runavíkar kommunu, Eysturkommunu, Vága kommunu, Sunda kommunu, Tvøroyrar kommunu, Fuglafjarðar kommunu og Nes kommunu frá, at eg hevði gjørt av at kanna viðgerðina av málum um innlit eftir innlitslógini hjá størru kommununum í Føroyum.

Sambært umboðsmanslógini § 6, stk. 6 kann umboðsmaðurin kanna viðgerðina hjá myndugleikunum av útvaldum málum. Myndugleikar hava í hesum sambandi skyldu at geva umboðsmanninum tær upplýsingar og at leggja fram tey skjøl, sum umboðsmaðurin krevur at fáa fyrilagt, sbrt. § 8, stk. 1.

Eg heitti á kommunurnar um at lata mær 5 tey seinast avgreiddu og játtaðu málini hjá kommununi, har søkt var um innlit eftir innlitslógini, og 5 tey seinast avgreiddu málini, har kommunan heilt ella partvís hevur sýtt at veita innlit.

Eg bað eisini kommunurnar um at greiða mær frá, hvussu tær hava skipað viðgerðina av innlitsmálum, og hvussu nógvar umbønir um alment innlit tær hava móttikið í 2020, 2021 og 2022.

Endamálið við kanningini var at kanna, hvussu størru kommunurnar í Føroyum handfara 10 daga regluna í innlitslógini, hvussu mál um innlit verða skrásett, viðgerðartíðina, og hvussu kommunurnar nokta innliti. Kanningin leggur tí dent á, at fáa eina heildarmynd av viðgerðini hjá kommunum av innlitsumbønum og at bøta um møguligar skipanarligar feilir og óhepnar mannagongdir, men viðgeri eg í hesi kanning ikki rættleikan í einstøku avgerðini. Eg havi tí bert biðið um avrit av umbønini um innlit, svarinum til innlitsumbønina og skjalayvirlitið úr teimum einstøku málunum.

Eftir umbøn frá mær hava kommunurnar sent mær málini, sum eru í kanningini. Skjótt gjørdist greitt, at fleiri av kommununum høvdu havt so mikið fá innlitsmál síðstu 3 árini, at tær ikki høvdu bæði 5 játtaði og 5 noktaði frá tíðarskeiðinum. Serliga vóru tað fáar noktandi avgerðir. Fyri at hava 10 mál frá hvørjari kommunu, bað eg tí um nøkur mál afturat við eini játtandi avgerð. Í sambandi við gjøgnumgongd av málunum havi eg samskift við kommunurnar um tey ivamál, sum hava verið undir viðgerðini, so eg fekk eina greiða fatan av einstøku málunum.

Í skrivinum til kommunurnar varð upplýst, at ætlanin var at savna viðgerðina av málunum í eina frágreiðing sum vantandi skuldi koma til heystar.

Tann 5. september 2023 sendi eg kommununum eina fyribilsfrágreiðing til viðmerkingar, so tryggjast kundi, at eg hevði rætta fatan av teimum faktuellu viðurskiftunum, áðrenn eg gjørdi endaliga niðurstøðu um viðgerðina hjá størru kommununum av innlitsmálum. Endaliga frágreiðingin er tillagað samsvarandi viðmerkingunum frá kommununum.

Málini í kanningini eru umrødd og endurgivin í navnleysum líki, men við dagfestingum er tíðargongdin sjónlig.

Tórshavn, 27. oktober 2023

Hanna Vang
Løgtingsins umboðsmaður

# 2 Samandráttur

Eg havi gjøgnumgingið tilsamans 84 mál hjá hesum kommunum

| | |
|---|---|
| Tórshavnar kommuna, | 10 mál |
| Klaksvíkar kommuna, | 10 mál |
| Runavíkar kommuna, | 10 mál |
| Eysturkommuna, | 10 mál |
| Vága kommuna, | 10 mál |
| Sunda kommuna, | 9 mál |
| Tvøroyrar kommuna, | 10 mál |
| Fuglafjarðar kommuna, | 10 mál |
| Nes kommuna, | 5 mál |

Flestu málini eru viðgjørd av kommununum í tíðarskeiðinum 2020 - 2023. Tó eru einstøk mál eldri. Sambært kommununum kemst hetta av, at neyðugt hevur verið at leita fleiri ár aftur í tíðina fyri yvirhøvur at finna mál, har myndugleikin heilt ella partvís hevur sýtt at geva innlit og í onkrum føri kemst hetta av, at kommunan hevur móttikið so fáar innlitsumbønir síðstu árini.

*Málsviðgerðartíðin*
Yvirhøvur er málsviðgerðartíðin stutt. Í flestu førum bert nakrar fáar dagar. Tað eru tó eisini fleiri mál har 10 daga freistin í § 16, stk. 2 í innlitslógini ikki er hildin. Eg havi tí mint kommunurnar á, at ein innlitsumbøn skal avgreiðast sum skjótast, og er umbønin ikki svarað innan 10 dagar, skal kommunan boða umsøkjaranum frá um orsøkina til hetta, og nær ein avgerð kann væntast.

*Samskiftisháttur*
Flestu innlitsáheitanirnar eru frá privat persónum, men nakrar eru eisini frá fjølmiðlum. Samskift verður aloftast umvegis teldupost, og innlitið verður eisini aloftast latið talgilt. Har ynski er um at fáa skjølini í pappírsavriti, fær borgarin boðið at koma á kommunuskrivstovuna eftir skjølunum.

*Gjald fyri innlit*
Flestu kommunur hava ikki kravt gjald fyri at lata innlit. Tær kommunur, sum hava kravt gjald, hava víst til kunngerð nr. 198 frá 15. desember 1993 um gjald fyri avrit og fotoavrit eftir lógini um innlit í fyrisitingina sum heimild fyri gjaldinum. Ein kommuna kravdi, at rokningin fyri innlitið var goldin, áðrenn skjølini vórðu latin umsøkjaranum. Í sambandi við viðurskiftini við gjaldi fyri innlit havi eg sent Løgmálaráðnum fyrispurning um kunngerðina um gjald (t.e. um gjald er eitt krav ella møguleiki, forútgjalding og talgilt innlit). Hesi viðurskifti verða viðgjørd undir kap.

4. Eg havi yvirfyri viðkomandi kommunu viðmerkt, at eg haldi, at sum meginregla skal gjald fyri innlit ikki krevjast sum forútgjalding.

*Skráseting*
Allar kommunurnar skráseta innlitsáheitanirnar í sjálvstøðug mál. Hetta ger tað lætt at leita málini fram, og er hetta eisini ein týðandi fortreyt fyri at kunna gera eina slíka kanning sum hesa hjá umboðsmanninum.

*Ófullfíggjaði svar*
Í sambandi við gjøgnumgongdina av málunum í hesi kanning havi eg í nøkrum førum lagt til merkis, at hóast tað framgongur av málsskjølunum, at viðkomandi ikki fær fult innlit, so framgongur tað ikki av avgerðini til borgaran, hvørji skjøl ella upplýsingar, myndugleikin hevur sýtt fyri at lata innlit í, umframt at hetta heldur ikki er gjørt greitt yvirfyri borgaranum. Í øðrum førum havi eg lagt til merkis, at málini eru avgreidd á ein slíkan hátt, at borgarin ikki sær, um myndugleikin hevur givið innlit í øll skjølini í málinum, ella um nøkur skjøl ella upplýsingar eru undantiknar. Eg havi tí mælt viðkomandi kommunum til at gera avgerðarskrivini um innlit greiðari.

*Fyrisitingarlig krøv til avgerðina*
Í nøkrum av kannaðu málunum manglar ein grundgeving fyri at nokta innlit og í nøkrum førum hevur grundgevingin ikki verið nøktandi.

Eitt mál, har søkt verður um innlit eftir innlitslógini, er eitt vanligt fyrisitingarmál, og reglurnar í fyrisitingarlógini eru galdandi fyri viðgerðina av málinum. Gevur ein myndugleiki ikki innlit í øll tey skjøl ella upplýsingar, sum søkt verður um innlit í, er talan um eina avgerð, sum ikki til fulnar gongur partinum á møti. Sambært fyrisitingarlógini hevur myndugleikin í slíkum førum skyldu til at grundgeva fyri sínari avgerð. Tað hevur m.a. stóran týdning fyri borgaran ella journalistin, tá gerast skal av, um ein avgerð skal kærast, hvør grundgevingin er fyri, at avgerðin ikki til fulnar gekk viðkomandi á møti, eins og tað er av avgerandi týdningi, at myndugleikin í sambandi við eina møguliga kæruviðgerð kann skjalprógva viðgerðina av málinum.

Manglar ein grundgeving fyri eini noktandi avgerð, er talan um grundleggjandi og týðandi tátt, sum vantar í málsviðgerðini. Myndugleikin skal týðiliga greiða frá, at innlit verður ikki givið í skjøl ella upplýsingar, eins og greiðast skal frá orsøkini til hetta.

Við tað at talan ikki er um fleiri av hesum dømum hjá somu kommunu, men einstøk dømi hjá onkrum kommunum, kann haldast, at talan er um einstakar feilir. Eg fari tó at mæla kommununum til framyvir at taka atlit at kravinum um grundgeving, tá tað ikki verður játtað fult innlit.

*Er talan um innlitsmál ella fyrispurning?*

Fleiri av málunum, sum kommunurnar hava latið mær til kanningina, hava víst seg at vera fyrispurningar og ikki mál um innlit. Tað tykist mær, sum kommunurnar ikki altíð gera sær greitt, um áheitanin frá borgaranum veruliga er ein innlitsumbøn, ella um talan er um ein fyrispurning. Fleiri fyrispurningar eru tí av órøttum skrásettir sum innlitsmál. Innlitslógin er galdandi, tá søkt verður um skjalainnlit t.v.s. innlit í skjøl og mál hjá myndugleikanum, meðan spurningar um ymisk viðurskifti hjá kommununi eru vanligir fyrispurningar, sum ikki eru fevndir av innlitslógini. Eg havi í hesum sambandi mælt viðkomandi kommunum til at gera eina neyvari kanning og skráseting av málunum í sambandi við móttøku av innlitsumbønum og fyrispurningum.

*Mannagongdir fyri innlitsmál*

Allar kommunur hava ikki gjørt sær vegleiðing ella mannagongd um viðgerðina av innlitsmálum. Skrivaðar mannagongdir/vegleiðingar og møguliga tilknýtt standarskriv, sum viðgera høvuðstættirnar í eini innlitsviðgerð, kunnu eftir mínum tykki bæði lætta og betra um málsviðgerðina. Eg havi tí mælt teimum kommunum, sum ikki longu hava gjørt mannagongd/vegleiðing á hesum øki, til at gera skrivliga mannagongd /vegleiðing fyri viðgerðina av innlitsmálum.

Um viðgerðina av einstøku málunum verður víst til viðmerkingar mínar undir einstaka málinum.

*Samanumtøka*

Alt í alt havi eg ta fatan, at borgarar sum meginregla fáa tað innlit, ið teir biðja um frá kommununum, og at kommunurnar royna at avgreiða innlitsumbønirnar sum skjótast. Tað tykist tó at vera ein afturvendandi trupulleiki, at kommunurnar gloyma at kunna borgaran, tá tær ikki klára at avgreiða innlitsumbønina innan 10 dagar. Eisini haldi eg, at sjálv avgreiðslan av innlitinum oftani ikki er nóg greið, tí borgarin sær ikki á svarinum frá kommununi, um hann hevur fingið fult ella bara partvíst innlit.

# 3 Um reglurnar í innlitslógini

Í hesum parti verður í stuttum greitt frá ásetingunum í lógini um alment innlit. Undir viðgerðini av einstøku málunum í frágreiðingini eru nakrar av ásetingunum í lógini og aðrir spurningar viðgjørdir nærri.

Innlitslógin (løgtingslóg nr. 133 frá 10. juni 1993 um innlit í fyrisitingina, sum broytt við løgtingslóg nr. 76 frá 8. mai 2001) kom í gildi 1. januar 1994. Landsstýri gjørdi í 1993 eina vegleiðing um innlit í fyrisitingina, sum umrøður so gott sum allar reglurnar í innlitslógini.

Lógin er galdandi fyri alt virksemið hjá almennu fyrisitingini, tað vil siga, bæði tá almennir myndugleikar taka avgerðir, tá almennir myndugleikar útinna tænastuvirksemi (faktiska fyrisiting) sum t.d. viðgerð á sjúkrahúsi ella undirvísing, og tá almennir myndugleikar fremja eginrættarligar gerðir sum t.d. gera sáttmála um keyp av telduútbúnaði, jbr. § 1, stk. 1.

Rætturin til innlit er tó treytaður av, at skjølini, sum biðið verður um innlit í, eru móttikin ella gjørd sum liður í fyrisitingarligari saksviðgerð í sambandi við virksemi myndugleikans, jbr. § 4, stk. 1.

Við heimild í innlitslógini kann ein og hvør, eisini í førum har tey ikki eru partur av einum máli, krevja at fáa høvi at gera seg kunnugan við skjøl, jbr. § 4, stk. 1, 1. pkt., og sambært stk. 3 skal viðkomandi skila til tey skjøl ella tað mál, sum viðkomandi ynskir at gera seg kunnugan við.

Sjálvt málið um innlit er eitt mál, har avgerð fer at verða tikin, og tann, sum biður um innlit, er partur í hesum málinum. Reglurnar í fyrisitingarlógini eru galdandi fyri viðgerðina av einum innlitsmáli, herundir t.d. eisini reglurnar um ógegni.

*Bygnaðurin í innlitslógini*
Í innlitslógini er ásett, at ein og hvør hevur rætt til skjalainnlit. Síðani verða nevnd tey mál, sum ikki ella bert partvís eru fevnd av rættinum til innlit. Í aðru atløgu verða nevnd tey skjøl, sum í útgangsstøðinum ikki eru fevnd av rættinum til innlit, og í triðju atløgu verða nevndar upplýsingar, sum kunnu undantakast rættinum til innlit. Lógin hevur at enda eisini ásetingar um málsviðgerðina av innlitsáheitanum.

*Høvuðsreglan*
Høvuðsreglan er, at tann, sum biður um innlit, hevur rætt til innlit í øll skjøl, og at tað krevst ein lógarheimild fyri at nokta innlit, t.v.s. at onnur áseting í lógini skal heimila, at skjøl ella upplýsingar verða undantikin innliti, jbr. § 4, stk. 1, 1. pkt.

Rætturin fevnir um innlit í skjøl, sum myndugleikin hevur gjørt ella hevur móttikið í sambandi við fyrisitingarliga viðgerð.

Ein myndugleiki hevur ikki skyldu til at framleiða nýggj skjøl í sambandi við viðgerðina av eini innlitsáheitan.

Lógin er ein sokallað minimumslóg. Hetta merkir, at lógin bert viðger, nær ein myndugleiki hevur skyldu at lata innlit. Lógin forðar ikki myndugleikunum í at geva einum borgara ella fjølmiðli innlit í størri mun (meirinnlit), um ikki aðrar reglur, sum t.d. reglurnar um tagnarskyldu forða fyri hesum, jbr. § 4, stk. 1, 2. pkt.

*Undantøka av málum*
Mál um setan í starv ella flytan í hægri starv verða ongantíð fevnd av rættinum til innlit, jbr. § 2, stk. 1.

Høvuðsorsøkin til hetta undantak er, at skulu almennir myndugleikar fáa best skikkaðu umsøkjararnar, er neyðugt at verja umsøkjarar ímóti, at onnur, sum t.d. verandi arbeiðsgevarin hjá viðkomandi, fær at vita, at viðkomandi søkir annað starv. Lógin er annars galdandi fyri mál um starvsfólk hjá tí almenna, t.d. agamál og uppsagnarmál.

*Undantøka av skjølum*
Sambært § 7 í innlitslógini fevnir rætturin til skjalainnlit ikki um innanhýsis arbeiðsskjøl. Hetta eru til dømis skjøl, sum verða gjørd av einum myndugleika til egna nýtslu so sum notatir og frágreiðingar, og brævaskifti millum ymiskar deildir innan fyri sama myndugleika.

Hóast eitt skjal er at meta sum eitt innanhýsis skjal, sum ikki er fevnt av rættinum til innlit, skal myndugleikin meta um, hvørt skjalið inniheldur upplýsingar, ið innlit eigur at verða givið í sambært § 11 í innlitslógini (ekstrahering). Hetta eru upplýsingar um veruligar umstøður, sum eru av stórum týdningi fyri málið.

Verður eitt innanhýsis skjal latið øðrum uttanfyri standandi, er skjalið ikki at meta sum eitt innanhýsis skjal longur og verður fevnt av rættinum til innlit.

Í § 8 er ásett, at ávís innanhýsis skjøl kortini eru fevnd av rættinum til innlit. Talan er um fýra ávís sløg av skjølum.

Sambært § 10 fevnir rætturin til innlit ikki um ávís onnur skjøl, herundir gerðabøkur hjá landsstýrinum, frásagnir frá fundum millum landsstýrismenn, og skjøl, ið verða gjørd av einum myndugleika til nýtslu á sovorðnum fundum.

*Undantøka av upplýsingum*
Sambært § 12 fevnir rætturin til innlit ikki um privatu, herundir fíggjarligu, viðurskiftini hjá einstaklingum, og endamálið við hesum er at tryggja friðin um privatlívið.

Rætturin til innlit fevnir heldur ikki um innlit í tøkniligar útbúningar, mannagongdir ella um rakstrar- ella vinnuviðurskifti ella líknandi, um so er, at tað hevur stóran fíggjarligan týdning fyri tann persónin ella tað virkið, sum upplýsingin viðvíkir, at áheitanin ikki verður gingin á møti.

Eftir § 13, stk. 1 kunnu upplýsingar undantakast almennum innliti grundað á almenn áhugamál. Tað snýr seg um trygd ella verju ríkisins, uttanríkispolitisk áhugamál, atlit at søkja at lógarbrotum, alment eftirlitsvirksemi, ávís almenn fíggjarlig áhugamál, umframt avís serlig almenn áhugamál.

Um bert ein partur av einum skjali kemur undir ásetingarnar í § 12, stk. 1 og 2 og § 13, stk. 1, skal umsøkjarin verða kunnaður við restina av skjalinum.

*Reglur um málsviðgerð av innlitsmálum*
Mál um innlit eru vanlig fyrisitingarlig mál, sum eru fevnd av reglunum í fyrisitingarlógini, sum t.d. reglunum um ógegni, grundgeving, vegleiðing v.m. Fyri málsviðgerðina av tílíkum málum galda eisini vanligu fyrisitingarrættarligu reglurnar um at upplýsa málið, reglurnar um skráseting v.m.

Afturat hesum reglum eru í innlitslógini ásettar serligar reglur um málsviðgerðina av innlitsáheitanum.

Tá biðið verður um innlit í eitt avgerðarmál, er tað sambært § 15, stk. 1 í innlitslógini tann myndugleikin, sum skal taka avgerð í málinum, sum skal taka støðu til innlitsspurningin. Er talan um mál, har eingin avgerð skal takast, er tað tann myndugleikin, sum hevur skjalið um hendi.
Avgerðir um skjalainnlit kunnu sambært § 15, stk. 2 kærast serstakt til tann myndugleika, ið er kærustovnur í mun til avgerðina í málinum, sum áheitanin um skjalainnlit viðvíkur.

Viðkomandi myndugleiki skal sambært § 16, stk. 1 sum skjótast gera av, um áheitanin um skjalainnlit kann verða gingin á møti. Er áheitanin ikki gingin á møti ella noktað innan 10 dagar eftir, at viðkomandi myndugleiki hevur fingið hana, skal myndugleikin boða frá orsøkini til hetta, og nær ein avgerð væntandi fer at verða tikin, jbr. § 16, stk. 2.

Myndugleikin, ið gevur innlit, ger sjálvur av, um hann/hon, sum er komin við áheitanini, skal verða gjørdur kunnigur við skjølini á tann hátt, at hann fær høvi til at hyggja ígjøgnum skjølini ella fær avrit av skjølunum.

*Gjald*
Í § 16 stk. 1 í innlitslógini er heimilað landsstýrinum at áseta reglur um gjald fyri avrit ella makaskjøl.

Landsstýrið hevur við heimild í § 16 stk. 3 ásett kunngerð nr. 198 frá 15. desember 1993 um gjald fyri avrit og fotoavrit eftir lógini um innlit í fyrisitingina. Sambært kunngerðini krevur viðkomandi myndugleiki sum meginregla gjald fyri avrit av skjølum í einum máli, sum verða latin sambært innlitslógini. Kravt verður 20 kr. fyri fyrstu síðuna og 1 kr. fyri hvørja byrjaða næstu síðu. Sí nærru undir pkt. 4 um kunngerðina.

# 4 Kunngerð nr. 198 frá 15. desember 1993 um gjald fyri avrit og fotoavrit

Gjøgnumgongdin av málunum í hesi kanning vístu, at kommunurnar fyri tað mesta ikki krevja gjald fyri at lata innlit, og at innlitið fyri tað mesta verður latið talgilt. Av tí at hetta reisti nøkur ivamál í mun til kunngerðina um gjald, setti eg, tann 21. august 2023, Løgmáláraðnum, sum varðar av innlitslógini, nakrar spurningar um ásetingar í kunngerðini. Tann 9. oktober 2023 fekk eg svar frá Løgmáláraðnum. Svarini síggjast undir hvørjum spurningi.

1. <u>Spurningur umboðsmansins: Skal myndugleikin krevja gjald fyri innlit</u>

Sambært § 16, stk. 3 í innlitslógini ásetir Landsstýrið reglur um gjald fyri avrit ella makaskjøl. Sambært § 1, stk. 1 í kunngerðini um gjald er ásett soleiðis: ”Fyri avrit ella fotoavrit av skjølum í einum máli, ið verða latin sambært lógini um innlit í fyrisitingina, krevur viðkomandi myndugleiki 20 kr. fyri fyrstu síðuna og 1 kr. fyri hvørja byrjaða næstu síðu, jbr. tó §§ 2-3.“

Tá kunngerðin sigur “krevur viðkomandi myndugleiki” gerst spurningurin, um myndugleikin hevur skyldu at krevja gjald, ella er talan um, at myndugleikin kann krevja gjald. Viðmerkjast skal, at siðvenjan er, at myndugleikarnir sjálvir avgera um og nær teir krevja gjald.

Metir Løgmálaráðið, at kunngerðin áleggur myndugleikunum at krevja gjald, tá teir lata innlit ?

Svarið frá Løgmáláraðnum:

> “Løgtingsins umboðsmaður hevur vent sær til Løgmálaráðið viðvíkjandi kunngerðini um gjald fyri avrit og fotoavrit eftir innlitslógini og biður Løgmálaráðið meta um, hvørt kunngerðin áleggur myndugleikunum at krevja gjald, tá teir lata innlit.
>
> § 1 í kunngerðini er soljóðandi:
>
> “Fyri avrit ella fotoavrit av skjølum í einum máli, ið verða latin sambært lógini um innlit í fyrisitingina, krevur viðkomandi myndugleiki 20 kr. fyri fyrstu síðuna og 1 kr. fyri hvørja byrjaða næstu síðu, jbr. tó §§ 2-3.”
>
> Løgmálaráðið metir, at ein tulking av orðaljóðinum í § 1 áleggur myndugleikunum at krevja gjald, tá avrit ella fotoavrit verða latin av skjølum í einum máli í sambandi við innlit.
>
> Løgmálaráðið hevur tó ta fatan, at flestu myndugleikar ikki krevja gjald fyri avrit ella fotoavrit í sambandi við innlit, tí arbeiðið við at krevja gjald fyri skjølini stendur ikki mát við upphæddina, sum skal krevjast inn.”

Eg eri samd við Løgmálaráðnum í, at ein tulking av orðaljóðinum í § 1 áleggur myndugleikunum at krevja gjald, tá avrit ella fotoavrit verða latin í sambandi við eina innlitsumbøn. Ivi kann tó vera um, um hetta var ætlanin við orðingini í § 1, ella um ætlanin bert var at skapa eina heimild at krevja gjald, m.a. tí einki eftirlit er um hesa skyldu. Eisini er tað so, at í praksis krevja flestu kommunur ikki gjald í hesum støðum. Tað er mín fatan, at hetta skyldast, at í flestu førum hevði eitt gjald verið so mikið lítið, at tað so at siga " ikki er ómakin vert" at krevja gjald, ella at arbeiði við at krevja gjald stendur ikki mát við gjaldið, ið verður kravt.

2. <u>Spurningur umboðsmansins: Talgilt innlit</u>

Tá kunngerðin varð gjørd í 1993, má gangast út frá, at fortreytin fyri kunngerðini var, at talan var um avrit og fotoavrit av pappírskjølum, og at innlitið varð latið í pappírsformi. Veruleikin í dag er ein annar, tí nú eru nærum øll skjøl talgild, og innlitið verður sum oftast eisini latið talgilt.

Metir Løgmálaráðið, at kunngerðin um gjald eisini fevnir um at lata talgilt innlit, og í so fall, metir Løgmálaráðið, at kunngerðin heimilar, at síðuteljingin í sambandi við talgilt innlit skal gerast á sama hátt, sum tá talan er um pappírsskjøl t.e. síðu fyri síðu í einstaka skjalinum.? Her verður hugsað um ólíku støðuna, har talgilt innlit verður latið sum einstakir fílar við nógvum síðum, meðan innlit í pappírsformi krevur ávíst arbeiði pr. síðu.

Svarið frá Løgmálaráðnum:

> "Umboðsmaðurin biður eisini Løgmálaráðið meta um, hvørt kunngerðin um gjald eisini fevnir um at lata talgilt innlit, og í so fall, um kunngerðin heimilar, at síðuteljingin í sambandi við talgilt innlit skal gerast á sama hátt, sum tá talan er um pappírsskjøl t.e. síðu fyri síðu í einstaka skjalinum.
>
> Løgmálaráðið metir ikki, at kunngerðin fevnir um gjald fyri at lata talgilt innlit, tí kunngerðin nevnir skilliga "avrit ella fotoavrit". Løgmálaráðið skilur hetta at vera skjøl í pappírsformi og ikki talgilt skjøl."

Hugtakið skjøl í innlitslógini er ætlað at hava ein breiðan týdning, so lógin um innlit ikki avmarkast eitt nú av tekniskari menning í umsitingini, sum t.d. at ein fyrisiting fer frá pappírsskjølum til talgilda fyrisiting  Sama er við háttinum at veita innlit. Eg haldi tí, at tað ikki er grundarlag fyri at tulka hugtakið "avrit ella fotoavrit" sum einans at verða avrit av pappírsskjølum, men at talgild skjøl og talgild avrit eisini mugu metast at vera fevnd av kunngerðini um gjald. Víst verður í hesum sambandi til pkt. 18 í Vegleiðing um innlit í fyrisitingina, frá 1993 frá Føroyar Landsstýri og til kap. 10, 11 og 22 í offentlighedskomissionens betænkning frá Justitministeriet nr. 1510/2009. Viðmerkjast kann, at hetta er eisini í samsvar við siðvenjuna á økinum.

3. Spurningur umboðsmansins: Gjald frammanundan

Tá tað ofta er týdningarmikið fyri borgararnar og fjølmiðlarnar at fáa skjalainnlitið skjótt, er í § 16 í innlitslógini ásett, at viðkomandi myndugleiki skjótast gjørligt skal gera av, um áheitan um skjalainnlit kann verða gingin á møti. Er ein áheitan um skjalainnlit ikki gingin á møti ella noktað innan 10 dagar eftir, at viðkomandi myndugleiki hevur fingið hana, skal myndugleikin geva fráboðan um orsøkina til hetta og um, nær avgerð væntandi fer at verða tikin.

At krevja gjald frammanundan at innlit verður veitt, kann, eftir míni metan, seinka avgreiðsluni av einum innlitsmáli. Vísandi til atlitini at skjótari avgreiðslu av eini innlitsumbøn verður spurt, um Løgmálaráðið metir, at ein myndugleiki hevur heimild at krevja, at gjald fyri innlit er goldið, áðrenn innlitið verður givið?

Svarið frá Løgmálaráðnum:

> “Umboðsmaðurin heldur, at tað kann seinka avgreiðsluni av einum innlitsmáli, um gjald verður kravt frammanundan. Umboðsmaðurin spyr, um Løgmálaráðið metir, at ein myndugleiki hevur heimild at krevja, at gjald fyri innlit er goldið, áðrenn innlitið verður givið.
>
> Sum nevnt omanfyri hevur Løgmálaráðið ta fatan, at nógvir myndugleikar ikki hava kravt gjald fyri avrit ella fotoavrit í sambandi við innlit, tí arbeiðið við at fáa upphæddina inn, aftan á at innlitið er latið, ikki stendur mát við arbeiðið at krevja upphæddina inn.
>
> Løgmálaráðið metir tó, at út frá endamálinum við ásetingini í § 1 í kunngerðini, kann myndugleikin krevja, at gjald fyri innlit í pappírsskjøl verður goldið í seinasta lagi samstundis við, at innlit verður latið.
>
> Løgmálaráðið skal vísa á, at kunngerðin um gjald fyri avrit og fotoavrit í sambandi við innlit er frá 1993. Síðani tá, eru umstøðurnar nógv broyttar á hesum økinum, og í dag verða tær flestu umlitisumbønirnar avgreiddar talgilt.
>
> Løgmálaráðið metir tí, at tíðin er komin til at endurskoða kunngerðina um gjald fyri avrit og fotoavrit í sambandi við innlit í fyrisitingina”

Eg eri samd við Løgmálaráðnum í, at tíðin er komin til at endurskoða kunngerðina um gjald fyri avrit og fotoavrit í samband við innlit í fyrisitingina. Harvið kann verða tikið støða til, um gjaldið fyri innlit skal vera tað sama ella ymiskt, alt eftir um innlitið verður latið í pappírsformi ella talgilt.

Hvat viðvíkur spurninginum um at krevja gjald, áðrenn innlitið verður givið, er tað mín fatan, at atlitið til skjóta viðgerð er meira avgerandi/týðandi, enn spurningurin um at hava eina smidliga og trygga gjaldskipan fyri innlit. Eg eri tí av tí fatan, at sum meginregla eigur gjald ikki at verða kravt áðrenn innlitið er givið, men at forútgjalding bert eigur at verða nýtt í eini serstøðu. Víst verður í hesum sambandi til niðurstøðuna hjá danska umboðsmanninum FOB nr. 1999.73 og til kap 22 pkt. 6 í offentlighedskomissionens betænkning frá Justitsministeriet nr. 1510/2009.

# 5 Mál um innlit, viðgjørd av kommunum, og viðmerkingar umboðsmansins

## 5.1 Tórshavnar kommuna

Sambært Tórshavnar kommunu móttók kommunan 226 umbønir um alment innlit í 2022, 233 umbønir í 2021 og 200 umbønir í 2020.

Tann 14. apríl 2023 læt Tórshavnar kommuna mær 5 síðstu málini, har innlit var játtað og 5 síðstu málini har innlit var heilt ella partvíst noktað.

*Mannagongd:*

Tórshavnar kommuna lýsir mannagongdina fyri viðgerð av innlitsmálum soleiðis:

> "Journalskipanin hjá Tórshavnar kommunu 360 hevur eitt innlitsmodul, ið verður nýtt í sambandi við innlitsmál. Mannagongdin er tann, at postur, ið verður sendur kommununi annaðhvørt sum bræv ella teldutøkt verður gjøgnumgingin av Snarskivuni/journalini, sum síðani fordeilir postin út á deildir og starvsfólk.
>
> Er talan um innlitsmál verða hesi skrásett í serligum innlitsmoduli í journalskipan kommununnar 360 og síðani flutt tí málsviðgera ella deild, ið varðir av málinum, ið innlitið snýr seg um.
>
> Útgangsstøðið er, at innlitsmál skulu svarast av teimum starvsfólkum/deildum, ið hava málini um hendi, ið innlitið snýr seg um. Í ávísum førum er neyðugt hjá fleiri starvsfólkum og deildum at samstarva um at svara umbønini, og er tørvur á løgfrøðiligari vegleiðing, er Stjórnarskrivstovan tøk at vegleiða í mun til ásetingarnar í innlitslógini ella øðrum lógum og reglum.
>
> Í innlitsmodulinum verður eitt skjalayvirlit genererað í svarskrivinum, ið skal fylgja við svarinum, tá ið umbønin um innlit verður svarað.
>
> Tórshavnar kommuna skipar áhaldandi fyri at førleikamenna starvsfólkini í fyrisitingini, og ein partur av hesum er kunning og vegleiðing um innlitslógina. Hetta verður gjørt við skeiðum, kunning á deildunum, í vegleiðingum á intranetinum og á annan hátt.
>
> Viðvíkjandi deildarleiðarunum, so verður væntað av hesum, at teir kenna høvuðsásetingarnar í innlitslógini, herundir regluna um, at innlit skal svarast skjótast gjørligt og innan 10 dagar.
>
> Inntil fyri stuttari tíð síðani lá viðhefta *"Mannagongd fyri innlitsmál"* á intranetinum hjá kommununi. Endamálið við mannagongdini er at kunna starvsfólkini í fyrisitingini um, hvussu farast skal fram, tá ið innlitsumbønir verða viðgjørdar.

Í sambandi við nýggja intranetið, sum varð tikið í brúk í fjør, er hetta skjal ikki flutt yvir í nýggju skipanina, men verður hetta gjørt í næstum, og tá er ætlanin eisini at dagføra skjalið, har hetta verður mett neyðugt.

Viðvíkjandi innlitsmodulinum í journalskipanini 360, so er hetta lutfalsliga nýtt, og tað kann ikki útilokast, at summi mál ikki verða skrásett sum innlitsmál í modulinum men bert upprættaði og svaraði sum vanlig mál í journalskipanini. Av tí sama kann hugsast, at hagtølini ikki eru heilt eftirfarandi, og at tað eru onnur innlitsmál í journalini, sum ikki eru skrásett sum innlitsmál, og sum tískil ikki framganga av yvirlitinum. Viðhefta yvirlit tekur bert tey mál við, sum eru skrásett og avgreidd sum innlitsmál í innlitsmodulinum.“

**5 síðstu málini har innlit var játtað**

**<u>Mál nr. 1</u>**
Tann 20. mars 2023 søkti borgari um innlit í eitt mál hjá kommununi.
Tann 30. mars 2023 játtaði kommunan innlit í 54 skjøl og vísti til eitt málsnummar og skjalayvirlit.
Í fylgiskrivinum til játtanarskrivið var viðmerkt, at játtað var innlit í øll skjølini í málinum.

**Onga viðmerking**

**<u>Mál nr. 2</u>**
Tann 20. mars 2023 søkti borgari um innlit í eitt byggimál.
Kommunan játtaði sama dag innlit í 8 skjøl.
Í játtanarskrivinum var víst til eitt málsnummar og 8 skjøl.

**Viðmerking** Um borgarin skuldi fáa vissu fyri, at hann hevði fingið innlit í øll skjølini í málinum, átti kommunan at havt tilskilað, at 8 skjøl vóru í málinum, soleiðis sum avritaða skjalayvirlitið vísti ella beinleiðis skrivað, at játtað var innlit í øll skjølini í málinum. Uttan hesa upplýsing hevði borgarin ongan møguleika fyri at meta um, hvørt hann fekk fult innlit ella bara partvíst innlit.

**<u>Mál nr. 3</u>**
Tann 16. mars 2023 søkti borgari um innlit í ávíst byggimál.
Kommunan játtaði innlit í 8 skjøl tann 17. mars 2023.
Í játtanarskrivinum var víst til eitt málsnummar og 8 skjøl. Í fylgiskjali var viðmerkt, at innlit var givið í øll 8 skjølini (undirskilt í málinum).

**Onga viðmerking**

**Mál nr. 4**

Tann 16. mars 2023 sendi borgari kommununi umbøn um innlit í eitt mál um broyting av byggisamtykt.
20. mars 2023 játtaði kommunan innlit í 27 skjøl.
Í játtanarskrivinum vísti kommunan til 3 skriv úr einum málsnummari og 24 skjøl úr einum øðrum málsnummari.

**Viðmerking** Um borgarin skuldi fáa vissu fyri, at hann hevði fingið innlit í øll skjølini í málinum, átti kommunan at havt tilskilað, at skjølini vóru skrásett í tveimum málsnumrum, og at tey innhildu ávikavist 3 og 24 skjøl, soleiðis sum avritaði skjalayvirlitið í játtanarskrivinum vísti. Uttan hesa upplýsing hevði borgarin ongan møguleika fyri at meta um, hvørt hann fekk fult innlit ella bara partvíst innlit.

**Mál nr. 5**

Tann 10. mars 2023 sendi borgari kommununi umbøn um alment innlit í ávíst byggiloyvi.
15. mars 2023 játtaði kommunan innlit í 9 skjøl.
Í játtanarskrivinum var víst til eitt málsnummar og yvirlit yvir 9 skjøl.

**Viðmerking** Sí viðmerking til mál 2 um, at eingin upplýsing er um, at talan er um øll skjølini í málinum.

**5 síðstu mál har innlit var heilt ella partvíst sýtt**

**Mál nr. 6**

Tann 16. februar 2023 bað borgari um innlit í eitt mál um keyp av lendi og innlit í mál um broyting av byggisamtykt.
Tann 22. februar 2023 kunnaði kommunan borgaran um, at gongd var í viðgerðini, og spurdi, um ynski var um innlit í alt málið um broytingina av byggisamtyktini ella bert ávísan part av broytingini. Borgarin svaraði, at hann ynskti bert innlit í ávísan part av broytingini. Seinni sama dag kunnaði kommunan um, at brek var á skipanini hjá kommununi, ið avgreiðir innlit, men at innlit kundi væntast um 2 dagar /fríggjadag ella um 5 dagar/mánadag.

Tann 28. februar 2023 játtaði kommunan innlit í 89 skjøl og vísti til 2 málsnummur og skjalayvirlit. Viðmerkt var, at innlit var noktað í 2 nevnd skjøl. Sama dag vendi borgarin sær aftur til kommuna og undraðist á, at skjølini hann hevði móttikið ikki nevndu eitt orð um viðgerð av eini umsókn frá hansara felag, og bað kommununa kannað, hví so var. Tann 1. mars 2023 svaraði kommunan, at til listan yvir skjøl, har innlit var noktað, átti ein grundgeving at verða knýtt at, men av onkrari orsøk var hesin ikki komin við. Síðani grundgav kommunan fyri, hví innlit var noktað í tey

tvey skjølini (innanhýsis arbeiðsskjøl gjørd til egna nýtslu), og vísti til § 7 í innlitslógini. Kommunan orsakaði samstundis seinu viðgerðartíðina.

**Viðmerking** Kommunan burdi havt tilskilað, at annað málið hevði 75 skjøl og hitt 16 skjøl, soleiðis sum avritaðu skjalayvirlitini vístu.
Tá avgreiðslan av innlitsmálinum dróg út, kunnaði kommunan, sum hon átti, borgaran um hetta, og nær málið kundi væntast avgreitt. Eg havi tí ikki viðmerking til, at tað ganga 12 dagar frá, at umsóknin var móttikin til innlit var játtað/noktað – sí § 16, stk. 2 í innlitslógini.

Eitt innlitsmál er eitt vanligt fyrisitingarligt mál, og kommunan hevur tískil skyldu til at greiða frá, um innlit verður játtað í øll skjølini ella ikki. Fær borgarin ikki innlit í øll skjølini, er talan um, at kommunan partvís sýtir umbønini, og í einum slíkum føri hevur kommunan sambært §§ 21 – 23 í fyrisitingarlógini skyldu til at greiða frá, hvørji skjøl, innlit ikki verður givið í, og hvør grundgevingin er fyri hesum.

Eg skal í hesum sambandi vísa á, at tað er av stórum týdningi, at myndugleikin skrásetir ella kann skjalprógva júst hvørji skjøl ella hvørjar upplýsingar, innlit ikki verður latið í. Hetta hevur m.a. eisini týdning í sambandi við eina møguliga kæru- ella klaguviðgerð av málinum, herundir tá metast skal um grundgevingina hjá myndugleikanum fyri at sýta innlit.

Sambært skjølunum fekk borgarin ikki nakra grundgeving fyri, hví innlit var noktað í 2 skjøl, tá innlitsumbønin varð avgreidd 28. februar. Men av tí at kommunan rættaði hetta mistakið í sínum skrivi tann 1. mars 2023, havi eg ikki meira at viðmerkja um hesi viðurskifti.

**<u>Mál nr. 7</u>**
Tann 3. apríl 2023 bað borgari um innlit í eitt byggimál.
Tann 4. apríl játtaði kommunan innlit í 105 skjøl. Víst var til ávíst málsnummar og eitt yvirlit yvir 106 skjøl. Samstundis var fráboðað, at innlit var noktað í 1 ávíst skjal, tí talan var um innanhýsis skjal.

**Viðmerking** Í hesum málinum er eingin vissa um mongdina av skjølum í málinum, tí tað verður ikki týðiliga upplýst, hvussu nógv skjøl tilsamans eru í málinum, ella at hetta eru øll skjølini í málinum, sí mína viðmerking til mál nr. 2.

**<u>Mál nr. 8</u>**
Tann 20. mars 2023 søkti eitt felag um alment innlit í eitt ávíst matrikul.
Sama dag bað kommunan felagið nágreina, hvat tey ynsktu innlit í.
Felagið svaraði beinanvegin, at ynski var um innlit í byggiloyvir, tekningar og umsóknir um byggiloyvir við øllum tilfari, sum hoyrdi til ávísa matrikul nummarið.

Sama dag játtaði kommunan innlit í 6 skjøl. Víst var til ávíst málsnummar, har yvirlitið vísti 9 skjøl. Innlit var noktað í 3 ávíst skjøl.

**Viðmerking** Viðvíkjandi upplýsing um, hvussu nógv skjøl eru í málinum, sí viðmerking undir mál nr. 2 og viðvíkjandi grundgeving fyri noktaðum innliti, sí viðmerking til mál nr. 6.

**Mál nr. 9**
Tann 10. februar 2023 bað felag um innlit í øll skjøl um teirra umsókn um keyp av lendi, herundir tilmæli ella frámæli til nevndir og/ella býráð.
Tann 16. februar var játtað innlit í 10 skjøl, meðan innlit var noktað í 10 skjøl. Viðmerkt var, at innlit var noktað, tí talan var um innanhýsis skjøl og partar av málslýsing, har avgerð enn ikki var tikin. Víst varð til ávíst málsnummar og yvirlit yvir 20 skjøl.

Tann 20. februar 2023 gjørdi felagið vart við, at tað vóru týðandi skjøl, sum ikki vóru send teimum t.d. frámæli frá umsitingini til nevnd v.m.

Tann 21. februar 2023 greiddi kommunan felagnum nærri frá grundgevingini fyri at nokta innlit í ávís skjøl og vísti til § 7 í innlitslógini um innanhýsis arbeiðsskjøl. Dagin eftir vendi felagið sær aftur til kommununa og grundgav fyri, hví tað var umráðandi at fáa innlit í frámælið til nevndina. Sama dag svaraði málsviðgerin, at fyrispurningurin mátti kannast nærri og at vent varð aftur við svari mánadag 27. februar 2023. Tann 2. mars 2023 rykti felagið eftir svari. Tann 8. mars 2023 rykti felagið aftur eftir svari. Sama dag svaraði kommunan, at fyrispurningurin mátti sendast víðari til nærri viðgerð og orsakaði tøgnina. Sama dag segði annar málsviðgeri frá, at tey vóru ikki klár við einum svari enn, men at miðja varð ímóti einum svari í endanum av vikuni.

Tann 11. mars 2023 rykti felagið eftir svari. Tann 12. mars 2023 svaraði kommunan, at eftir endurskoðan av málinum varð játtað innlit í innanhýsis arbeiðsskjalið / tilmælið til nevndina. Víst varð til §§4 (meirinnlit) og 11 í innlitslógini (veruligar umstøður, sum eru av stórum týdningi fyri málið) og til § 26 í fyrisitingarlógini (ikki trúnaðarupplýsingar).

**Viðmerking** Tá kommunan lovaði svar ávísan dag (27. februar), og hetta ikki helt, átti kommunan at sagt frá hesum, og hví og nær svar so kundi væntast. Eisini áttu áminningarnar at verða svaraðar sum skjótast, eisini um støðan var, at málið ikki var liðugt viðgjørt.

**<u>Mál nr. 10</u>**
Tann 17. februar 2023 bað borgari um alment innlit í eitt klagumál um eitt bilverkstað.
Tann 7. mars 2023 orsakaði kommunan fyri seint svar og segði, at tey nú hugdu eftir málinum, og at svar kundi væntast í vikuni.
Tann 9. mars 2023 játtaði kommunan innlit í 12 skjøl og noktaði innlit í 2 skjøl. Víst varð til ávíst málsnummar og yvirlit sum vísti 14 skjøl.

**Viðmerking** Viðvíkjandi upplýsing um, hvussu nógv skjøl eru í málinum, sí viðmerking undir mál 2.

Tá ið ein myndugleiki fær eina umbøn um innlit, skal myndugleikin sambært § 16, stk. 1 í innlitslógini sum skjótast taka støðu til, um umbønin kann verða gingin á møti. Um hetta ikki er gjørligt innan 10 dagar, skal viðkomandi hava eina fráboðan um orsøkina til hetta, og nær væntast kann, at ein avgerð fyriliggur, jbr. § 16, stk. 2 í innlitslógini. Vísandi til hetta er tað ikki nøktandi, at áheitanin í fyrsta umfari slapp at liggja ósvarað í 18 dagar (frá 17. feb. til 7. mars). Tað er heldur ikki nøktandi, at eingin grundgeving var givin fyri noktaða innlitinum, sí viðmerking undir mál nr. 6.

**Viðmerking um gjald**
Í hesum málum hjá Tórshavnar kommunu, sum eg havi gjøgnumgingið, hevur kommunan ikki kravt gjald fyri at lata avrit av teimum skjølum, ið innlit er givið í.

***Samanumtikið fyri málini hjá Tórshavnar kommunu haldi eg, at játtanarskrivini eru ikki nóg neyv, tí tey geva ikki vissu fyri, at talan er um øll skjølini í málinum. Eg fari tí at mæla kommununi til at gera skrivini greiðari, so eingin ivi er um, hvussu nógv skjøl eru tilsamans í tí viðkomandi málinum, og um innlit verður latið í øll skjølini.***

***Tórshavnar kommuna hevur skipaða mannagongd fyri viðgerðina av innlitsumbønum, og sum meginregla verður 10 daga reglan í § 16 í innlitslógini hildin. Einkult dømi er um, at noktandi innlit ikki verður grundgivið, men tykist hetta ikki sum ein stórur trupulleiki.***

## 5.2 Klaksvíkar kommuna

Sambært skjølunum frá Klaksvíkar kommunu móttók kommunan 59 umbønir um alment innlit í 2022, 68 umbønir í 2021 og 87 í 2020.

Tann 17. apríl 2023 móttók eg frá Klaksvíkar kommunu 5 síðstu málini, har innlit var játtað og 5 síðstu málini har innlit var heilt ella partvíst noktað.

*Mannagongd*
Klaksvíkar kommuna hevur greitt soleiðis frá um mannagongdina fyri viðgerð av innlitsmálum :

> "Viðvíkjandi mannagongdum fyri innlitsumbønir skal sigast at allar innlitsumbønir, óansæð um tær verða sendar til høvuðsmail klaksvik@klaksvik.fo ella til beinleiðis til starvsfólk, verða skrásettar í móttøkuni, Miðlan, og mál verður síðani stovnað av Miðlan deildini.
>
> Tá mál verður stovnað í journalskipanini, er ábyrgdarpersónurin sum útgangsstøði, tann málsviðgerin sum varðar av økinum, og løgfrøðingur er altíð knýttur uppí sum partur av toyminum.
>
> Um talan er um eitt umfatandi mál við nógvum skjølum, verður journalleiðarin biðin um at finna fram viðkomandi tilfar.
>
> Til kunningar
> Um mál er knýtt at einum politiskum spurningi, verður tað sent til góðkenningar hjá kommunustjóranum, áðrenn innlitsumbønin verður avgreidd.
>
> Um tað eru ivamál, ella um tað er eitt viðkvæmt evni, verður tað sent til kunningar hjá avvarðandi deildarstjóra.
>
> Innlitsmál, ið eru knýtt av starvsfólkaøkinum verða sent til góðkenningar hjá starvsfólkadeild."

**5 síðstu málini har innlit var játtað**

**<u>Mál nr. 11</u>**
Tann 26. august 2022 søkti journalistur um innlit í allar upplýsingar, sum høvdu nakað at gera við atgongd hjá amerikanska flotanum til Runavíkar Havn. Tann 9. september 2022 spurdi journalisturin, nær hann kundi vænta svar.

Sama dag spurdi kommunan, um talan var um ein feil, tí í skrivinum var víst til Runavíkar Havn.
Journalisturin rættaði beinanvegin umbønina til at vera viðvíkjandi atgongd til Klaksvíkar Havn.
Tann 12. september 2022 sendi kommunan móttøkuváttan og kunning um skráseting av máli, og at umbønin var latin til málsviðgera.
Tann 19. september svaraði kommunan, at hon hevði onki samskifti havt um hesi viðurskifti, og tí vóru ongin skjøl at veita innlit í.

**Viðmerking** Tá ið ein myndugleiki fær eina umbøn um innlit, skal myndugleikin sambært § 16, stk. 1 í innlitslógini sum skjótast taka støðu til, um umbønin kann verða gingin á møti. Um hetta ikki er gjørligt innan 10 dagar, skal viðkomandi sambært § 16, stk. 2 í innlitslógini hava eina fráboðan um orsøkina til hetta, og nær væntast kann, at ein avgerð fyriliggur,. Vísandi til hetta er tað ikki nøktandi, at áheitanin í fyrsta umfari slapp at liggja ósvarað í 14 dagar (26. august – 9. september) og í øðrum umfari, - eftir at journalisturin spurdi eftir málinum, og feilurin í umbønini varð rættaður – at tað gingu 10 dagar afturat, ella tilsamans 24 dagar, til kommunan svaraði, at hon ongin skjøl hevði at geva innlit í.

Viðmerkjast skal, at tá ein umbøn um innlit verður móttikin, er skilagott at gera eina snarkanning av málinum, so staðfestast kann, hvussu umfatandi viðgerð kann væntast. Hareftir ber vanliga eisini til skjótt at taka støðu til, um málið kann avgreiðast beinanvegin – sum t.d. her, tá kommunan ikki hevur nakað skjal at geva innlit í – ella hvørji stig skulu takast fyri at fremja viðgerðina av málinum.

Umbønin varð ikki skrásett hjá kommununi fyrr enn 12. september, sum eru 17 dagar eftir móttøku av innlitsumbønini. Hetta er ikki nøktandi. Skjøl sum almennur myndugleiki móttekur og eigur at skráseta, eiga at verða skrásett sum skjótast eftir móttøku t.e. vanliga sama dag ella ein arbeiðsdag eftir, og altíð áðrenn skjølini verða latin víðari til avgreiðslu.

**<u>Mál nr. 12</u>**
Tann 7. november 2022 bóðu bæði borgari og eitt felag um innlit í ávíst málsnummar og tekningar, sum eitt byggiloyvi var givið eftir, og hvørji frávik, har vóru givin.
Tann 8. nov. 2022 váttaði kommunan fyri móttøku, og at málið var skrásett og latið málsviðgera.

Tann 14. november 2022 játtaði kommunan innlit í skjølini, ið vóru skrásett í málinum. Upplýst varð samstundis, at enn var einki byggiloyvi givið, men bleiv hetta væntandi lagt fyri nevnd 5. des. 2022, og at fyribils var játtað loyvi til at taka niður og planera.

**Viðmerking** Onga viðmerking

**Mál nr. 13**

Tann 12. desember 2022 bað eitt fakfelag um innlit í lønarútgjaldingar fyri nov. 2022 sambært einum av teirra sáttmálum. Viðheft varð yvirlit yvir, hvussu lønirnar skuldu bólkast í stig, ársverk, løn, eftirløn og viðmerkingar. Eisini varð biðið um innlit í tal av børnum í vøggustovu, barnagarð, forskúla og frítíðarskúla í nov. 2022.
Tann 16. desember 2022 váttaði kommunan móttøku, og at málið var skrásett og latið málsviðgera.
Tann 21. desember 2022 svaraði kommunan, at allar umbidnar upplýsingar vórðu sendir til Kommunala Arbeiðsgevarafelagið (KAF), og at lættast var, um felagið vendi sær til KAF um alment innlit í hesar upplýsingar. Tann 2. januar 2023 skrivaði felagið, at KAF segði seg ikki hava móttikið hesar upplýsingar.
Tann 17. januar 2023 lat kommunan felagnum yvirlit yvir, hvussu nógv ársverk vóru á hvørjum lønarstigi. Samstundis upplýsti kommunan, hvat hesi fingu í eftirløn, at tímalønt fáa ávíst eykagjald, og ávís starvsfólk fáa førleikaviðbót.

**Viðmerking** Hetta mál er eftir míni metan ikki eitt mál um innlit, men ein fyrispurningur. Talan er ikki um innlit í ávíst mál ella skjal, men um at savna saman ymiskar upplýsingar fyri at kunna svara einum fyrispurningi. Av tí at innlitslógin ikki er galdandi fyri viðgerðina av málinum, havi eg ikki viðmerking til viðgerðina, men av tí at málið av kommununi er bólkað og viðgjørt sum innlitsmál, er tað ikki tikið úr kanningini.

**Mál nr. 14**

Tann 22. februar 2023 bað ein fjølmiðil um alment innlit í yvirlit yvir, hvussu nógv børn frá 0 til 6 ár vóru skrásett at vera innskrivað í dagstovnar hjá Klaksvíkar kommunu árini 2011, 2015 og 2022, og hvussu nógv børn í sama aldri til samans vóru í kommununi somu ár.
Tann 23. februar sendi kommunan móttøkuváttan og upplýsti, at umbønin var skrásett og latin málsviðgera.
Tann 27. februar 2023 sendi kommunan svar við teimum hagtølum, kommunan hevði.

**Viðmerking** Hetta málið er eftir míni metan ikki eitt mál um alment innlit, men ein fyrispurningur, tí talan er ikki um innlit í ávíst mál ella skjal, men um at seta saman tøl til hagtøl. Víst verður í hesum sambandi til viðmerkingar mínar undir mál 13.

**<u>Mál nr. 15</u>**
Tann 26. februar 2023 bað ein borgari um innlit í, hvørji loyvir kommunan hevði ella fór at geva til tiltøk á/í Biskupstorgi ávísar dagar.
Tann 3. mars 2023 svaraði kommunan innlitsumbønini og sendi viðkomandi skjølini.
Tann 4. mars 2023 vendi borgarin sær aftur til kommununa, tí viðkomandi helt seg ikki hava fingið skjøl sum umbiðið. Eisini varð umbønin víðkað til onnur skjøl. Sambært notati tosaði málsviðgerðin tann 6. mars 2023 við borgaran og kunnaði um, at kommunan hevði ikki onnur skjøl, enn tey sendu.
Tann 10. mars 2023 skrivaði kommunan til borgaran um tað, sum var greitt frá í telefonsamrøðuni 6. mars 2023.

**Onga viðmerking**

**5 síðstu málini har innlit var heilt ella partvíst játtað**

**<u>Mál nr. 16</u>**
Tann 26. apríl 2022 bað felag um alment innlit í ávís skjøl í tilgongdini kring útboð og avgerð um val av tryggingarveitara hjá Klaksvíkar kommunu.
Tann 27. apríl 2022 váttaði kommunan fyri móttøku av umbønini og upplýsti, at umbønin var skrásett og latin málsviðgera. 5. mai 2022 fregnaðist felagið eftir svari.
Tann 6. mai 2022 svaraði kommunan, at tey høvdu funnið fram skjølini, men at mannagongdin í samband við “vinnuligar innlitsumbønir” var, at allir partar í málinum, tvs. aðrir tilboðsgevarar skulu hava møguleika at síggja innlitsumbønina, tilfarið, og at koma við viðmerkingum. Kommunan segði, at innlitsumbønin fór væntandi at verða avgreidd fyrst í komandi viku.
Tann 2. juni 2022 minti felagið kommununa á málið.
Sama dag gav kommunan felagnum innlit í eitt upprit um tey viðkomandi viðurskiftini. Kommunan hevði strikað yvir ymiskar upplýsingar í uppritinum.

**Viðmerkingar** Tá ein myndugleiki tekur avgerð um at undantaka upplýsingar í einum skjali frá innliti (ekstrahera), er talan um eina partvís noktandi avgerð. Reglurnar í kap. 6 í fyrisitingarlógini um grundgeving v.m. eru tí eisini galdandi fyri slíkar avgerðir. Klaksvíkar kommuna átti tískil at grundgivið fyri undantøkuni og víst til heimildina fyri undantøkuni.

Sambært § 16, stk. 1 í innlitslógini skal ein myndugleiki sum skjótast taka støðu til, um ein umbøn um alment innlit kann verða gingin á møti. Um hetta ikki er gjørligt innan 10 dagar, skal viðkomandi sambært § 16, stk. 2 í innlitslógini hava eina fráboðan um orsøkina til hetta, og nær væntast kann, at ein avgerð fyriliggur. Vísandi til hetta er tað ikki nøktandi, at áheitanin slapp at liggja ósvarað frá 26. apríl 2022 til 2. juni 2022, og at kommunan ikki fylgdi upp uppá sína kunning frá 6. mai 2022 um,

at umbønin fór at verða avgreidd fyrst í komandi viku. Tá kommunan ikki kundi avgreiða málið sum fráboðað felagnum, átti kommunan at vent aftur til felagið við frágreiðing um longdu viðgerðartíðina.

**Mál nr. 17**
Tann 8. september 2022 bað ein fjølmiðil um innlit í samskifti millum Klaksvíkar kommunu og eitt felag í sambandi við útbyggingina av vinnuøkinum í Borðoyarvík og journalyvirlit, fundarfrásagnir og onnur viðkomandi skjøl í hesum sambandi.
Sama dag váttaði kommunan fyri móttøku og upplýsti, at umbønin var skrásett og latin málsviðgera.
Tann 13. september 2022 svaraði kommunan fjølmiðlinum, at umbønin um skjalainnlit varð ikki gingin á møti vísandi til § 13, stk. 1, nr. 5 í innlitslógini av tí orsøk, at samráðingarnar enn vóru í gongd. Viðmerkt varð, at møguligt var at biðja um skjalainnlit, tá málið varð lokað.

**Onga viðmerking**

**Mál nr. 18**
Tann 2. juni 2021 bað borgari um innlit í eitt ávíst byggiloyvi.
Tann 7. juni 2021 svaraði kommunan, at umsóknin um byggiloyvi var ikki liðugt viðgjørd, og at innlit ikki varð givið, fyrr enn avgerð var tikin í málinum. Viðmerkt varð, at tá avgerð var tikin, bar til at søkja innlit av nýggjum. Samstundis játtaði kommunan innlit í umsóknina um byggiloyvi og viðmerkti, at tað var ikki søkt um frávik frá galdandi ásetingum fyri økið.

**Viðmerking** Sambært innlitslógini § 5, stk. 1 er tað liðugt framleidd ella móttikin skjøl, sum kommunan hevur skyldu at lata innlit í. Eg havi tí ikki viðmerking til, at kommunan lat innlit í umsóknina, hóast avgerð enn ikki var tikin um sjálvt byggiloyvið.

**Mál nr. 19**
Tann 28. november 2022 bað borgari um innlit í, hvussu bíðilistin til grundstykkir virkar, og hvussu frammarlaga hann var á listanum.
Tann 29. november 2022 váttaði kommunan móttøku av umbønini og upplýsti, at umbønin var skrásett og latin málsviðgera.
Tann 5. desember 2022 svaraði kommunan, at upplýsingarnar, sum biðið var um, vóru almennir upplýsingar, og at ein og hvør borgari hevði rætt at biðja um innlit í grundstykkjalistan. Tó var ikki møguligt at veita innlit í, hvørji onnur nøvn vóru á listanum. Síðani svaraði kommunan uppá ítøkiligar spurningar frá borgaranum um, hvussu nógv fólk vóru á bíðilistanum, og hvussu frammarlaga borgarin stóð, og greiddi frá, hvussu listin virkaði.

**Viðmerking** Eftir míni metan er talan heldur um ein fyrispurning enn um alment innlit, tí talan er ikki um at veita innlit í ávíst skjal, men um at svara nøkrum fyrispurningum og greiða frá, hvussu bíðilistin virkar. Hetta vísur svarið frá kommununi eisini, tí kommunan sendi ikki nakað skjal við upplýsingum til borgaran, men skrivaði honum eina frágreiðing.
Av tí at kommunan hevur bólkað málið sum innlitsmál er tað ikki tikið úr kanningini.

**<u>Mál nr. 20</u>**
Tann 20. februar 2023 bað felag um innlit í útbjóðingina av fjarskifti. Víst varð til skjøl, sum annað felag (kappingarneyti) hevði fingið innlit í.
Tann 23. februar 2023 svaraði kommunan, at kappingarneytin hevði fingið innlit í tilmælið, ið varð lagt fyri fíggjarnevndina í sambandi við alment útboð og tele- og dátusamskifti, og at felagið skuldi fáa hetta tilfarið sendandi sum skjótast. Seinni sama dag viðmerkti kommunan yvirfyri felagnum, at felagið fekk ikki innlit í eindarprísir hjá øðrum felag, bert heildarprísir. Tann 27. februar 2023 sendi kommunan felagnum skjølini, sum innlit varð játtað í. Í skjølunum var strikað yvir teir upplýsingar, sum kommunan noktaði innlit í. Sama dag takkaði felagið fyri móttiknu skjølini.

**Viðmerking** Viðvíkjandi støðuni tá ein myndugleiki tekur avgerð um at undantaka upplýsingar í einum skjali frá innliti, verður víst til viðmerkingar mínar til mál nr. 16.

**Viðmerking um gjald**
Í hesum málum hjá Klaksvíkar kommunu, sum eg havi gjøgnumgingið, hevur kommunan ikki kravt gjald fyri at lata avrit av teimum skjølum, ið innlit er givið í.

***Samanumtikið fyri málini hjá Klaksvíkar kommunu haldi eg, at málini kundu verið neyvari gjøgnumgingin við móttøku, so kommunan gjørdi sær greitt, um talan var um eitt innlitsmál ella fyrispurning, og skrásetti hareftir. Er talan um innlitsmál eigur eisini við eini snarkanning at verða mett um, hvussu skjótt málið kann avgreiðast, so mál av lættari slag ikki bíða óneyðuga leingi.***

***Í fleiri av málunum er 10 daga reglan í § 16 stk. 2 í innlitslógini ikki hildin. Tí verður mælt kommununi til framyvir at skipa viðgerðina av innlitsmálum soleiðis, at atlit verða tikin at 10 daga regluni og at geva kunning, um málið ikki kann avgreiðast áðrenn.***

***Dømi er um, at kommunan ikki grundgav fyri teimum ekstraheringum, hon gjørdi. Tá ekstrahering er ein partvíst noktandi avgerð, eigur kommunan at greiða frá og grundgeva fyri, hví innlit ikki var givið í allar upplýsingar í skjalinum.***

## 5.3 Runavíkar kommuna

Sambært Runavíkar kommunu móttók kommunan 12 umbønir um alment innlit í 2022, 7 umbønir í 2021, og 9 umbønir í 2020

Tann 4. apríl 2023 sendi Runavíkar kommuna mær 5 innlitsmál. Tann 5. apríl 2023 gjørdi eg kommununa varuga við, at eg bert hevði fingið 5 játtandi innlitsmál frá teimum, og at eg eisini hevði biðið um avrit av 5 teimum síðstu noktandi avgerðunum um innlit t.v.s. avgerðir, har tað heilt ella partvíst er noktað innlit.

Tann 6. mai 2023 svaraði kommunan, at hon hevði ikki noktað nakað innlit, men í onkrum máli biðið umsøkjaran nágreina, hvat hann ynskir innlit í, tí umbønin hevur verið ov umfatandi til at kunna svarast. Kommunan viðmerkti, at hetta høvdu tey ofta gjørt umvegis telefon, men nokta innlit heilt ella partvís høvdu tey ikki.

Eg bað tí kommununa um ístaðin fyri 5 noktandi innlitsmál at senda mær 5 mál afturat frá 2022, so tað tilsamans eru 10 mál frá kommununi við í kanningini.

Tann 10. mai 2023 sendi Runavíkar kommuna 5 mál afturat.

*Mannagongd*
Viðvíkjandi mannagongdini fyri viðgerð av innlitsmálum greiddi kommunan frá:

> "Innlitsmálini verða stovnaði í journalini, tá tey koma inn og svarað sum skjótast, og svarið journaliserað, áðrenn málið verður lokað."

**5 síðstu málini har innlit var játtað**

**<u>Mál nr. 21</u>**
Tann 13. september 2022 bað borgari um alment innlit í, um Runavíkar kommuna hevur gjørt avtalu við Búnaðarstovuna um ávíst øki, og um so er, at síggja avtaluna. Sama dag váttaði kommunan móttøku av innlitsumbønini og kunnaði um, at umbønin var skrásett og latin víðari til avgreiðslu.
Tann 21. september svaraði kommunan, at tað vóru 10 ár síðan, at leigusáttmálin millum kommununa og Búnaðarstovuna var uppsagdur, og at Búnaðarstovan nú leigar tað viðkomandi økið út til annan stovn.

**Onga viðmerking**

**<u>Mál nr. 22</u>**

Tann 27. september 2022 bað ein fjølmiðil um innlit í ætlaðu broytingarnar í byggisamtyktini fyri neystaøkið. Víst varð til, at tað sum hevði áhugað var: dato, nær tað er upprættað sum mál, hvør hevði upprættað tað sum mál, hvussu nógvir fundir høvdu verið um hesar broytingar, hví kommunan ikki hevði boðað Føroya Landsstýri frá hesum, soleiðis sum hon átti sambært galdandi reglum.
Sama dag váttaði kommunan fyri móttøku og upplýsti, at umbønin var skrásett og koyrd víðari til avgreiðslu.
Tann 7. oktober 2022 svaraði kommunan og greiddi frá um gongdina í málinum og svaraði spurningum frá borgaranum. Viðmerkt var, at uppskotið (dato) frá teknisku deild til broyting av reglunum fyri neyst varð mett sum innanhýsis skjal, tí hetta er eitt uppskot, sum nevndirnar hava útsett viðgerðina av, og ongin niðurstøða er gjørd í málinum annað enn, at málið er útsett.

**Viðmerking** Umbønin var bæði ein innlitsumbøn og fyrispurningur. Hetta sást eisini í svarinum frá kommununi, har kommunan greiddi frá gongdini í málinum heldur enn at senda tey viðkomandi skjølini. Tann parturin av umbønini, sum var viðgjørdur sum innlit, var sjálvt broytingaruppskotið, sum kommunan noktaði innlit í við tí grundgeving, at talan var um innanhýsis skjøl.
At sýta innlit er ein noktandi avgerð. Fyrisitingarlógin er tí galdandi fyri avgerðina, og burdi kommunan, tá hon grundgav fyri noktanini, eisini at gjørt tilvísing til tær rættarreglur, sum avgerðin var grundað á.

**<u>Mál nr. 23</u>**

Tann 13. oktober 2022 bað borgari um innlit í eitt mál um 5G mastrina, sum verður sett upp á Skála.
Tann 14. oktober 2022 sendi kommunan móttøkuváttan, og 26. oktober 2022 játtaði kommunan innlit og sendi borgaranum skjølini í sambandi við umsókn frá NET um uppsetan av 5G mastrini á Skála og loyvið frá kommununi.

**Viðmerking** Sambært skjølunum, eg havi móttikið, var í játtanarskrivinum hvørki nevnt, hvussu nógv skjøl vóru í málinum, ella hvussu nógv skjøl innlit varð latið í. Játtanin varð soljóðandi: "... verður viðheft sent tær skjølini í samband við ..” Ein slík orðing gevur ikki vissu fyri, at borgarin fekk øll skjølini, sum vóru í tí viðkomandi málinum. Kommunan átti at upplýst, hvussu nógv skjøl vóru í málinum og viðlagt skjalayvirlit yvir skjølini í málinum.

Tað gingu 13 dagar (13. okt.) frá, at kommunan móttók umsóknina, til hon var svarað (26. okt.).

Sambært § 16, stk. 1 í innlitslógini skal ein myndugleiki sum skjótast taka støðu til, um ein umbøn um alment innlit kann verða gingin á møti. Um hetta ikki er gjørligt

innan 10 dagar, skal viðkomandi hava eina fráboðan um orsøkina til hetta, og nær væntast kann, at ein avgerð fyriliggur, jbr. § 16, stk. 2 í innlitslógini. Vísandi til hetta, er tað ikki nøktandi, at áheitanin hóast móttøkuváttan, slapp at liggja ósvarað frá 13. okt. 2022 til 26. okt. 2022. Tá kommunan ikki kundi avgreiða málið innan 10 dagar, átti hon at sagt borgaranum frá og greitt frá orsøkini til hetta, og eisini sagt borgaranum, nær hann kundi vænta sær svar.

**Mál nr. 24**

Tann 27. oktober 2022 bað borgari um innlit í ávíst byggiloyvi.
Sama dag (um kvøldið) játtaði kommunan innlit í skjølini í málinum. Kommunan skrivaði: "Viðheft skjølini í málinum um umbygging av matr. nr..."

Tann 28. oktober 2022 váttaði kommunan fyri móttøku av umbønini og upplýsti, at umbønin var skrásett og latin víðari til avgreiðslu. Hetta er dagin eftir, at málið varð avgreitt um kvøldið.

**Viðmerking** Viðvíkjandi manglandi skjalayvirliti og upplýsing um, hvussu nógv skjøl talan er um, verður víst til mínar viðmerkingar til mál nr. 23.
Hvat viðvíkur skráseting og kunning eftir at málið er avgreitt, verður mælt kommununi til at tryggja at journalin altíð hevur dagførdan status um eitt mál.

**Mál nr. 25**

Tann 13. desember 2022 sendi borgari kommununi skriv um innlit í nøkur mál og vísti til 8 spurningar um ymisk viðurskifti í Runavíkar kommunu, eitt nú hvussu nógvir býráðsfundir høvdu verið í Runavíkar kommunu í 2021 og 2022, hvørjir býráðslimir hava møtt til ymisku býráðsfundirnar, og um varafólk vórðu biðin um at møta, tá nr. 1 valdi ikki fekk møtt.
Sama dag sendi kommunan móttøkuváttan og kunnaði um, at umbønin var skrásett og latin víðari til avgreiðslu.
Tann 14. desember 2022 svaraði kommunan: "Flestu av spurningunum kanst tú fáa svar uppá við at hyggja inna á heimasíðuna hjá Runavíkar kommunu www.runavik."
Í yvirlitinum yvir spurningarnar vísti kommunan í nøkrum førum til heimasíðu teirra, meðan hon í nøkrum førum beinleiðis svaraði spurninginum.
Sama dag takkaði borgarin fyri svar, men viðmerkti, at tað hevði klætt kommununi betur at svara spurningunum og víst til, hvar hann skal leita. Hann hevði ikki biðið um at fáa upplýst, hvar hann kundi finna nakrar upplýsingar, men at hann hevði biðið kommununa um alment innlit, t.v.s. at kommunan gav honum svar uppá spurningarnar.
Tann 22. desember 2022 sendi kommunan borgaranum yvirlit yvir luttøkuna á býráðsfundum í 2021 og 2022, har tað sást, hvør hevði luttikið á teimum ymisku býráðsfundunum.

**Viðmerking**
Hetta málið er eftir míni metan ikki eitt mál um alment innlit, men ein fyrispurningur, tí talan er ikki um innlit í ávíst mál ella skjal, men um at svara ávísum spurningum. Av tí at innlitslógin ikki er galdandi fyri viðgerðina av slíkum málum, havi eg ikki viðmerkingar til viðgerðina, men av tí at málið av kommununi er bólkað og viðgjørt sum innlitsmál, er tað ikki tikið úr kanningini

**Tey 5 eyka málini**

<u>**Mál nr. 26**</u>
Tann 23. mai 2022 søkti borgari um innlit í viðurskifti um nýggja turrdokk á Skála og setti samstundis nakrar spurningar til kommununa.
Sama dag váttaði kommunan móttøku av umbønini og kunnaði um, at málið var latið víðari til avgreiðslu.
Tann 31. mai 2022 svaraði kommunan: “Viðheft skjølini í samband við umsókn um byggiloyvi til nýggja turrdokk á Skála. Málið er ikki viðgjørt politisk enn, annað enn at býráðið er kunnað um ætlanina á fundi 4. nov. 2021. Við teldupostinum fylgdu 9 skjøl.”
Tann 3. juni 2022 sendi borgarin áminning um málið.
Tann 7. juni skrivaði kommunan : “eg sendi tær skjølini við teldupost 31. mai 2022, men tey hevur tú óivað ikki fingið – eg geri eina roynd afturat + sendi skjøl “
Tann 11. juni 2022 skrivaði borgarin :” royni einaferð afturat. Eg vil hava svar uppá spurningar á viðhefta skjali, sum fyrstu ferð bleiv sent 22. mai 2022. Eg havi trupulleikar við hinari mail adressuni, so eg brúki hesa adressu fyribils.”
Tann 14. juni 2022 skrivaði kommuna: “Hevur tú ikki móttikið nakað svar frá mær? Eg havi sent teldupost til tín tvær ferðir í samband við fyrru umbøn tína og ikki fingið nakra feilmelding, tá eg havi sent – so eg havi verið í góðari trúgv um, at tú hevur fingið svar uppá tað, tú spurdi um tá. Hetta skrivið hevur nógvar fleiri spurningar enn tað fyrra, men eg skal royna at svara so væl sum gjørligt um nakrar dagar, tí stundir verða neyvan til tað í hesum vikuni, vænti eg.”
Borgarin svaraði:”Jú eg havi móttikið mail frá tykkum. Men eg sakni svar uppá spurningarnar. Har eru faktisk 13 spurningar um dokkina – sí viðheft, sum bleiv sent 23. mai.”
Tann 27. juni 2022 sendi borgarin áminning um svar uppá sínar spurningar. Sama dag svaraði kommunan.:”Av tí at tað hevur verið og er sera nógv at gera í sambandi við seinastu nevndarfundirnar og býráðsfundin, sum eru áðrenn summarferiuna havi eg ikki havt stundir at avgreiða umbøn tína, men skal royna at fáa tað gjørt í hesi vikuni.”
Tann 1. juli 2022 skrivaði borgarin: ”av tí at eg ikki fái svar uppá mínar spurningar, sum bleiv sent 22 mai, verið eg noyddur at fara til aðrar innstansir, um teir kunnu skumpa undir tykkum.”

Tann 4. juli 2022 sendi kommunan svar til borgaran uppá spurningar hansara og nýggju dokkina. Viðv. skjølum var viðmerkt: "tað fyriliggja ikki upprit av fundum og telefonsamskifti í samband við óformellar fundir, sum hava verið millum Runavíkar kommunu og ..., men nakrir fundir hava verið." Eingin skjøl vórðu send við.

**Viðmerking** Málið er merkt av, at talan er um eina blanding av eini innlitsumbøn og fyrispurningum. Innlitsparturin verður svaraður 1 viku eftir móttøku av innlitsumbønini, og seinni verða fyrispurningarnir svaraði. Trupulleikar við teldupostadressu hjá borgaranum og ógreidleiki um, hvat er móttikið, ger málið fløkt. Men av tí at hetta viðvíkur fyrispurninginum hava eg ikki viðmerkingar til hesi viðurskifti.
Viðvíkjandi innlitspartinum er at viðmerkja, at tað vanta upplýsingar um, hvussu nógv skjøl eru í málinum, og um innlitið í 9 skjøl, er innlit í øll skjølini í málinum – víst verður í hesum sambandi til viðmerkingar mínar til mál nr. 23.

**<u>Mál nr. 27</u>**
Tann 22. juni 2022 bað ein fjølmiðil um innlit í øll skjøl og samskifti í tíðarskeiðinum frá 1. januar 2022 til 22. juni 2022, sum høvdu við ætlaða fjøruvegin at gera.
Sama dag sendi kommunan móttøkuváttan og kunning um, at málið var skrásett og koyrt víðari til avgreiðslu.
Tann 27. juni 2022 skrivaði kommunan: "tú mást nágreina umbønina meira neyvt – tí bara at biðja um øll skjøl í málinum er ein ómøgulig uppgáva at loysa. Hvat er tað neyvt tú ynskir upplýsingar/skjøl um?"
Fjølmiðilin svaraði 28. juni 2022: "Nú er hon tíðaravmarkað, so hon skuldi ikki verið so umfatandi, men eg skilji væl, at tit hava úr at gera. Vit kunnu avtala tað, at um eg fái journalyvirlitið yvir hetta tíðarskeiðið í dag, so kann eg markera, hvørji skjøl eru relevant. So taka vit tað harfrá."
Sama dag svaraði kommunan: "Vísandi til telefonsamrøðu fyri løtu síðan, sendi eg tær hetta og vísti til skjal við samtyktum frá nevndarviðgerðunum. Eisini varð viðheftur samandráttur av málinum, sum kommunan ætlaði at leggja á heimasíðu sína."

**Viðmerkingar** Sum skilst førdi telefonsamtala millum fjølmiðil og kommununa til, at funnið varð fram til, hvørjar upplýsingar/skjøl fjølmiðilin ynskti innlit í, og varð málið eftir hetta avgreitt samsvarandi hesum ynski.

Sambært § 4, stk. 3 skal ein áheitan um skjalainnlit skila til tey skjøl ella tað mál, sum viðkomandi ynskir at verða gjørdur kunningur við. Kravt kann tí verða, at tann, ið ynskir skjalainnlit, undir øllum umstøðum hevur ein ávísan kunnleika til, at málið er til, áðrenn hann vendir sær til myndugleikan. Umsitingin hevur ikki skyldu til at

ganga eini áheitan á møti um at síggja øll mál av einum ávísum slag ella øll mál, ið eru journaliserað í einum ávísum tíðarskeiði.

**<u>Mál nr. 28</u>**
Tann 6. juli 2022 bað advokatur vegna ein klient um innlit í málið um bygging av dokk hjá Mest á Skála.
Sama dag sendi kommunan móttøkuváttan. Seinni sama dag svaraði kommunan innlitsumbønini og viðhefti skjølini í sambandi við umsókn um byggiloyvi til nýggja turrdokk á Skála. Viðmerkt varð, at málið ikki var viðgjørt politiskt enn, annað enn at býráðið var kunnað um ætlanina á fundi 4. nov. 2021.

**Viðmerking** Hvat viðvíkur skjalayvirliti og tal av skjølum í málinum verður víst til viðmerkingar mínar til mál nr. 23.

**<u>Mál nr. 29</u>**
Tann 8. august 2022 bað borgari um innlit í partar av verkætlanini hjá kommununi um keyp av gróti frá Tunnilsfelagnum. Samstundis setti borgarin nakrar nágreinandi spurningar.
Tann 16. august 2022 sendi kommunan móttøkuváttan og kunnaði um, at málið var skrásett og sent víðari til avgreiðslu.
Tann 7. september 2022 sendi kommunan borgaranum avtaluna við Tunnilsfelagið, sum í høvuðsheitinum eisini svaraði spurningunum.

**Viðmerking** Hvat viðvíkur viðgerðartíðini verður víst til viðmerkingar mínar til mál nr. 23.

**<u>Mál nr. 30</u>**
Tann 27. mai 2022 søkti fjølmiðil um alment innlit í málið hjá Mest at byggja nýggja turrdokk á Skála. Nágreinað varð, hvat innlitsumbønin fevndi um.
Tann 30. mai sendi kommunan móttøkuváttan.
Tann 1. juni 2022 játtaði kommuna innlit og sendi "viðheft skjølini í samband við umsókn um byggiloyvi til nýggja turrdokk á Skála". Viðmerkt var: ”Málið er ikki viðgjørt politiskt enn, annað enn at býráðið er kunnað um ætlanina á fundi 4/11-2021."

Tann 7. juni 2022 sendi kommunan fjølmiðlinum eitt skjal afturat um málið.

**Viðmerking** Í innlitsjáttanini sæst ikki nevnt, hvussu nógv skjøl vóru í málinum, sí viðmerking mína hesum viðvíkjandi til mál nr. 23.

**Viðmerking um gjald**
Í hesum málum hjá Runavíkar kommunu, sum eg havi gjøgnumgingið, hevur kommunan ikki kravt gjald fyri at lata avrit av teimum skjølum, ið innlit er givið í.

*Samanumtikið fyri málini hjá Runavíkar kommunu haldi eg, at játtanarskrivini eru ikki nóg neyv, tí tey geva ikki vissu fyri, at talan er um øll skjølini í málinum. Eg fari tí at mæla kommununi til at gera skrivini greiðari, so eingin ivi er um, hvussu nógv skjøl eru tilsamans í tí viðkomandi málinum, og um innlit verður latið í øll skjølini.*

*Á skjalayvirlitinum úr málinum sæst eingin dagfesting fyri skjølini t.v.s. tað sæst ikki, nær tey eru móttikin ella send ella, hvør dagfesting er á skjalinum. Tað er sostatt ikki gjørligt at kunna seg um tíðargongdina í málinum bara við at hyggja eftir skjalayvirlitinum. Eg fari at mæla Runavíkar kommunu til framyvir at skráseta eina dagfesting fyri skjølini, sum verða skrásett í einum máli, soleiðis at ein dagfesting sæst í skjalayvirlitinum.*

*Kommunan er skjót at senda móttøkuváttan, tá innlitsumbøn er móttikin. Tó eru dømi um at 10 daga reglan í § 16 stk. 2 í innlitslógini ikki er hildin.*

*Sum skilst hevur Runavíkar kommuna ikki nakra skrivaða mannagongd fyri viðgerðina av innlitsmálum. Skrivaðar mannagongdir og møguliga tilknýtt standardskriv eru eitt gott amboð hjá umsitingini, tí hetta kann lætta um málsviðgerðina av innlitsmálum. Eg fari tí at mæla Runavíkar kommunu til at gera skrivliga mannagongd fyri viðgerðina av innlitsmálum.*

## 5.4 Eysturkommuna

Sambært Eysturkommunu móttók kommunan 1 umbøn um alment innlit í 2022, 10 umbønir í 2021 og 7 umbønir í 2020.

Tann 31. mars 2023 móttók eg frá Eysturkommunu 5 síðstu málini, har innlit var játtað. Eysturkommuna upplýsti, at kommunan hevur ongantíð noktað innlit í sambandi við umbøn um alment innlit í mál. Tó er komið fyri, at neyðugt hevur verið at strika persónsupplýsingar og aðrar upplýsingar, sum kommunan ikki hevur skyldu til at veita innlit í, so sum innanhýsis arbeiðsskjøl.

Tann 5. apríl 2023 bað eg kommununa um at senda okkum 5 tey síðstu málini, har kommunan hevur strikað upplýsingar, og har tað ikki er veitt innlit, tí talan er um innanhýsis arbeiðsskjøl. Kommunan svaraði, at talan var bert um 1 mál av hesum slag, og avtalað var hareftir, at kommunan skuldi senda mær 4 innlitsmál afurat, so tað tilsamans eru 10 mál til kanningina.

*Mannagongd*
Viðvíkjandi mannagongd fyri viðgerð av innlitsmálum hevur Eysturkommuna upplýst soleiðis:

> "Tá kommunan móttekur umbøn um alment innlit, verður mál stovnað og latið tí málsviðgera, sum hevur ábyrgd á økinum til avgreiðslu innan ásettu tíðarfreistina."

**5 síðstu málini har innlit var játtað**

**<u>Mál nr. 31</u>**
Tann 14. oktober 2021 bað borgari um alment innlit í samskifti millum Eysturkommunu og aðra kommunu um seg.
Tann 21. oktober 2021 svaraði kommunan, at talan bert var um telefonsamrøðu um adressuskráseting. Av tí at kommunan metti, at talan ikki var um mál, har kommunan hevði notatskyldu, var onki noterað, og sostatt vóru eingi skjøl at geva innlit í.

**Onga viðmerking**

**<u>Mál nr. 32</u>**
Tann 24. oktober 2021 bað borgari um innlit í ávíst byggimál.
Tann 5. november 2021 játtaði kommunan innlit. Kommunan skrivaði: "Viðfest eru fílurnar í samband við innlitsumbøn tína." ... "Um tú ynskir fílurnar í pappírsformi,

kunnu tær heintast á býráðsskrivstovuni. Vit goyma tær í 2 vikur, síðani verða tær burturbeindar."

Kommunan kravdi gjald - grundgjald á 20 kr. og síðani 1 kr. pr. síðu - tilsamans 226 kr.

**Viðmerking** Í játtanarskrivinum var hvørki nevnt, hvussu nógv skjøl vóru í málinum, ella hvussu nógv skjøl innlit var latið í. Játtanin var soljóðandi: "...viðfest eru fílurnar í samband við innlitsumbøn tína." Ein slík orðing gevur ikki vissu fyri, at borgarin fekk øll skjøl, sum vóru í tí viðkomandi málinum. Kommunan átti at upplýst, hvussu nógv skjøl vóru í málinum og viðlagt skjalayvirlit yvir skjølini í málinum.

Tað gingu 12 dagar (24. okt.) frá, at kommunan móttók umsóknina, og til hon var svarað (5. nov.).

Sambært § 16, stk. 1 í innlitslógini skal ein myndugleiki sum skjótast taka støðu til, um ein umbøn um alment innlit kann verða gingin á møti. Um hetta ikki er gjørligt innan 10 dagar, skal viðkomandi hava eina fráboðan um orsøkina til hetta, og nær væntast kann, at ein avgerð fyriliggur, jbr. § 16, stk. 2 í innlitslógini. Vísandi til hetta er tað ikki nøktandi, at áheitanin slapp at liggja ósvarað frá 24. okt. 2021 til 5. nov. 2021. Tá kommunan ikki kundi avgreiða málið innan 10 dagar, átti hon at sagt borgaranum frá og greitt frá orsøkini til hetta, og eisini sagt borgaranum, nær hann kundi vænta sær svar.

**<u>Mál nr. 33</u>**
Tann 24. oktober 2021 bað borgari um innlit í kostnaðin av hvørjum næmingi í framhaldsdeildini seinastu 40 árini.
Tann 27. oktober 2021 svaraði kommunan og greiddi frá skúlaskipanini í Eysturkommunu og avtaluni við Fuglafjarðar kommunu um, at næmingar frá kommununi ganga í framhaldsdeildini í Fuglafirði. Kommunan upplýsti samlaða kostnaðin fyri árini 2009-2020 og at ikki bar til at fara longur aftur. Innlit var ikki givið í nakað ávíst skjal.

**Viðmerking** Hetta mál snýr seg eftir míni metan ikki um innlit, men er ein fyrispurningur. Viðgerðin vísur eisini, at talan er um ein fyrispurning, tí innlit verður ikki givið í nakað ávíst skjal, men upplýsingarnar at svara fyrispurninginum verða savnaðir til høvi. Av tí at kommunan hevur bólkað málið sum innlitsmál, er tað ikki tikið úr kanningini.

**<u>Mál nr. 34</u>**
Tann 30. mai 2022 bað borgari um innlit í eitt byggimál.

Tann 14. juni 2022 svaraði kommunan: “Her er svar uppá tína umbøn um innlit”. Viðlagt vórðu skjøl úr tí viðkomandi málinum.

**Viðmerking** Svarið frá kommununi hevði ongar upplýsingar um, hvussu nógv skjøl málið hevði. Víst verður til viðmerking mína til mál nr. 32.
Tað gingu 14 dagar (30. mai) frá, at kommunan móttók umsóknina, og til hon var svarað (14. juni).

Sambært § 16, stk. 1 í innlitslógini skal ein myndugleiki sum skjótast taka støðu til, um ein umbøn um alment innlit kann verða gingin á møti. Um hetta ikki er gjørligt innan 10 dagar, skal viðkomandi hava eina fráboðan um orsøkina til hetta, og nær væntast kann, at ein avgerð fyriliggur, jbr. § 16, stk. 2 í innlitslógini. Vísandi til hetta er tað ikki nøktandi, at áheitanin slapp at liggja ósvarað frá 30. mai til 14. juni. Tá kommunan ikki kundi avgreiða málið innan 10 dagar, átti hon at sagt borgaranum frá orsøkini til hetta, og nær borgarin kundi vænta sær svar.

**<u>Mál nr. 35</u>**
Tann 12. desember 2022 bað fakfelag um innlit í lønarútgjaldingarnar hjá Eysturkommunu í nov. 2022 eftir sáttmálanum millum seg og annað felag. Biðið varð um, at upplýsingarnar vórðu settar upp eftir stigi, ársverk, løn og eftirløn.
Tann 20. januar 2023 svaraði kommunan við at lata fakfelagnum upplýsingar yvir ársverk og barnatal fyri stovnarnar í kommununi. Víst varð til, at løn og eftirløn var eftir ávísum sáttmála.

**Viðmerking** Hetta mál er eftir míni metan ikki eitt mál um innlit, men ein fyrispurningur, tí talan er ikki um innlit í ávíst mál ella skjal, men um at savna saman ymiskar upplýsingar fyri at kunna svara einum fyrispurningi. Av tí at innlitslógin ikki er galdandi fyri viðgerðina av málinum, havi eg ikki viðmerking til viðgerðina, men av tí at málið av kommununi er bólkað og viðgjørt sum innlitsmál, er tað ikki tikið úr kanningini.

**Tey 5 eyka málini**

**<u>Mál nr. 36</u>**
Tann 27. november 2020 bað borgari um innlit í eitt mál um ávíst matr. nr.
Tann 3. desember 2020 svaraði kommunan: ”Viðfest eru fílurnar í samband við innlitsumbøn tína” og kravdi gjald.

**Viðmerking** Svarið frá kommununi hevði ongar upplýsingar um, hvussu nógv skjøl málið hevði. Víst verður til viðmerking mína til mál nr. 32 um hesi viðurskifti.

**Mál nr. 37**
Tann 17. mai 2021 bað eitt felag um avrit av einum ávísum byggiloyvi.
Tann 27. mai játtaði kommunan innlit og sendi felagnum avrit av byggiloyvinum.

**Onga viðmerking**

**Mál nr. 38**
Tann 22. desember 2020 bað borgari um innlit í skjalatilfar viðvíkjandi einum ávísum byggimáli, fundarfrásagnir frá ástaðarfundi, og møguligt tilfar um samanlegging við annað matr. nr.
Tann 29. desember 2020 sendi kommunan móttøkuváttan og segði, at umsitingin var í jólafrí. Samstundis kunnaði kommunan um, at málið fór at verða tikið upp, tá skrivstovan latur upp aftur eftir nýggjar.
Tann 14. januar 2021 játtaði kommunan innlit og skrivaði soleiðis til borgaran: "Viðfest eru fílurnar í samband við innlitsumbøn tínar" og kravdi gjald. Hvat viðvíkti skjølum um samanlegging við annað matr. nr. upplýsti kommunan, at hon hevði ikki nakað tilfar um samanleggingina.

**Viðmerking** Svarið frá kommununi hevði ongar upplýsingar um, hvussu nógv skjøl málið hevði. Víst verður til viðmerking mína til mál nr. 32 um hesi viðurskifti.
Við tað at kommunan longu 1 viku (22. des - 29. des) eftir móttøku av innlitsumbønini kunnaði borgaran um, at málið ikki kundi avgreiðast fyrr enn eftir nýggjár, havi eg ikki aðrar viðmerkingar enn, at kommunan átti at raðfest at avgreitt málið beinanvegin í nýggja árinum og ikki bíða við at avgreiða málið til 14. januar**.**

**Mál nr. 39**
Tann 26. oktober 2020 bað felag um innlit í klagur um ávíst felag í ávísum tíðarskeiði.
Tann 6. november 2020 svaraði kommunan: "Viðfest eru skjøl viðvíkjandi kærum, sum tú biður um."

**Viðmerking** Hvat viðvíkur tali av skjølum verður víst til viðmerkingar mínar til mál nr. 32.

**Mál nr. 40**
Tann 14. mai 2018 bað borgari um innlit í sáttmála um skúlasamstarv við Fuglafjarðar kommunu, undirskrivaður 31. august 2017, og ymiskt skjalatilfar, tá skúlanæmingar hava gingið í framhaldsdeild í aðrari kommunu.
Tann 30. mai 2018 svaraði kommunan innlitsumbønini við einum frágreiðandi svari og sendi borgaranum viðkomandi skjølini og kravdi gjald. Viðvíkjandi umbidna sáttmálanum var viðmerkt, at sáttmálin var ikki til skjals hjá Eysturkommunu, og harvið var einki sáttmálaskjal at geva innlit í. Viðmerkt var, at kommunan hevði spurt seg fyri hjá Fuglafjarðar kommunu og Mentamálaráðnum, men har funnu tey heldur

ikki sáttmálan. Í nøkrum av skjølunum vórðu nøvn á persónum strikað út. Kommunan greiddi borgaranum frá hesum og hví og vísti sum heimild fyri undantøku av upplýsingunum til § 12 stk. 1 í innlitslógini. Kommunan kravdi gjald á 101 kr.

**Viðmerking** Tað gingu 16 dagar frá at kommunan móttók innlitsumbønin, til hon varð svarað. Víst verður til viðmerkingar mínar til mál nr. 32 um 10 daga regluna í § 16 í innlitslógini.

**Viðmerking um gjald**
Av málunum, sum eg havi gjøgnumgingið hjá Eysturkommunu sæst, at kommunan í nøkrum førum krevur gjald fyri avgreiðslu av innlitsumbønum samsvarandi kunngerð nr. 198 frá 15. desember 1993 um gjald fyri avrit og fotoavrit eftir lógini um innlit í fyrisitingina.

***Samanumtikið fyri málini hjá Eysturkommunu haldi eg, at játtanarskrivini eru ikki nóg neyv, tí tey geva ikki vissu fyri, at talan er um øll skjøl í málinum. Eg fari tí at mæla kommununi til at gera skrivini greiðari, so eingin ivi er um, hvussu nógv skjøl eru tilsamans í tí viðkomandi málinum, og um innlit verður latið í øll skjølini.***

***Í nøkrum málum er 10 daga reglan í § 16 í innlitslógini ikki hildin. Eg fari at minna kommununa á, at ein innlitsumbøn skal avgreiðast sum skjótast, og er umbønin ikki svarað innan 10 dagar, skal kommunan boða umsøkjaranum frá um orsøkina til hetta, og nær ein avgerð kann væntast.***

***Sum skilst hevur Eysturkommuna ikki nakra skrivaða mannagongd fyri viðgerðina av innlitsmálum. Skrivaðar mannagongdir og møguliga tilknýtt standardskriv eru eitt gott amboð hjá umsitingini, tí hetta kann lætta um málsviðgerðina av innlitsmálum. Eg fari tí at mæla Eysturkommmunu at gera skrivliga mannagongd fyri viðgerðina av innlitsmálum.***

## 5.5 Vága kommuna

Vága kommuna fekk 9 umbønir um alment innlit í 2022, 2 umbønir í 2021 og 15 umbønir í 2020.

*Mannagongd*:
Vága kommuna hevur greitt soleiðis frá, um teirra mannagongd fyri viðgerð av innlitsmálum:

> "Tá umbønir um alment innlit koma til Vága kommunu, so koma tær fyrst inn til móttøkuna. Síðani fer tað víðari til viðkomandi málsviðgera at avgreiða. Er einki bein í umsóknini so avgreiðir málsviðgerin umbønina saman við journalføraranum, sum trekkir skjølini út úr málinum í journalskipan okkara, um talan er um eina játtan. Eru ivamál um rættin til innlit, verður tað lagt fyri stjóran til støðutakan. "

Tann 14. apríl 2023 móttók eg 5 tær seinastu játtaðu innlitsumbønirnar og 3 sum vóru sýttar. Fyri at hava tilsamans 10 mál frá Vága kommunu við í kanningini, bað eg um 2 mál afturat. Hesi fekk eg 31. august 2023.

**5 síðstu málini har innlit var játtað**

**<u>Mál nr. 41</u>**
Tann 29. mai 2022 bað borgari um alment innlit í eitt mál um renovering av ávísum húsi.
Tann 7. juni 2022 játtaði kommunan innlit. Viðmerkt var, at 20 skjøl vóru viðgjørd og við skjølunum var yvirlit, sum vísti ávíst málsnummar við skjølunum nr. 1-19 og nr. 21.
Eg havi spurt kommununa um skjal 20. Kommunan svaraði: "Skjal nr. 20 er undantikið innlitið, tá talan er um eitt innanhýsis arbeiðsskjal."

**Viðmerking** Í játtanarskrivinum varð sagt, at 20 skriv vóru viðgjørd, og at fult innlit var játtað í hesi, men ikki, hvussu nógv skjøl vóru í málinum. Víst varð til yvirlit við 20 eyðmerktum skjølum frá nr. 1-19 og nr. 21.
Ein slík orðing gevur ikki vissu fyri, at borgarin fekk øll skjøl, sum vóru í tí viðkomandi málinum. Kommunan átti at upplýst, hvussu nógv skjøl vóru í málinum og viðlagt skjalayvirlit, har øll skjøl vóru á, t.v.s. í hesum føri eisini nr. 20, so borgarin sá um hann fekk fult innlit ella bara partvíst innlit.

Eitt innlitsmál er eitt vanligt fyrisitingarligt mál, og kommunan hevur tískil skyldu til at greiða frá, um innlit verður játtað í øll skjølini ella ikki. Fær borgarin ikki innlit

í øll skjølini, er talan um, at kommunan partvís sýtir umbønini, og í einum slíkum føri hevur kommunan sambært §§ 21 – 23 í fyrisitingarlógini skyldu til at greiða frá, hvørji skjøl, innlit ikki verður givið í, og hvør grundgevingin er fyri hesum.
Eg skal í hesum sambandi vísa á, at tað er av stórum týdningi, at myndugleikin skrásetir ella kann skjalprógva júst hvørji skjøl ella hvørjar upplýsingar, innlit ikki verður latið í. Hetta hevur m.a. eisini týdning í sambandi við eina møguliga kæru- ella klaguviðgerð av málinum, herundir tá metast skal um grundgevingina hjá myndugleikanum fyri at sýta innlit.
Sambært skjølunum fekk borgarin ikki upplýst, at innlit varð noktað í eitt skjal ella nakra grundgeving fyri, hví innlit varð noktað í skjal 20, tá hann fekk innlit frá kommununi. Hetta er ikki í trá við reglurnar í § 21-23 í fyrisitingarlógini.

**<u>Mál nr. 42</u>**
Tann 3. oktober 2022 bað borgari um partsinnlit í byggimál á ávísum matr.
3. november játtaði Vága kommuna innlit. Viðmerkt varð, at 24 skjøl vóru viðgjørd í mun til innlitsumbønina og viðlagt skjølunum var skjalayvirlit, sum vísti 24 skjøl.

**Viðmerking** Kommunan hevur játtað innlit og ikki gjørt nakað burturúr, um talan er um partsinnlit ella alment innlit, men bólkað tað sum alment innlit. Málið er tískil tikið við í kanningina. Tá innlit varð játtað, var viðmerkt: ”I alt 24 dokumenter er behandlet i processesen” og yvirlit yvir skjøl merkt frá 1 - 24 var viðlagt.

Viðgerðartíðin í hesum máli var frá 3. oktober til 3. november t.v.s. ein mánað.
Sambært § 16, stk. 1 í innlitslógini skal ein myndugleiki sum skjótast taka støðu til, um ein umbøn um alment innlit kann verða gingin á møti. Um hetta ikki er gjørligt innan 10 dagar, skal viðkomandi hava eina fráboðan um orsøkina til hetta, og nær væntast kann, at ein avgerð fyriliggur, jbr. § 16, stk. 2 í innlitslógini. Vísandi til hetta er tað ikki nøktandi, at áheitanin slapp at liggja ósvarað í ein mánað. Tá kommunan ikki kundi avgreiða málið innan 10 dagar, átti hon at sagt borgaranum frá og greitt frá orsøkini til hetta, og eisini sagt borgaranum, nær hann kundi vænta sær svar.

**<u>Mál nr. 43</u>**
Tann 12. desember 2022 bað fakfelag um innlit í lønarútgjaldingarnar hjá Vága kommunu í nov. 2022 eftir sáttmálanum millum seg og annað felag Biðið varð um at upplýsingarnir vóru settir upp eftir stigi, ársverk, løn og eftirløn.
Tann 13. desember 2022 sendi kommunan felagnum eitt til høvi framleitt yvirlit yvir lønarkoyring í november fyri fast – og tímalønt starvsfólk lønt eftir ávísum sáttmála. Innlit varð ikki givið í nakað sjálvstøðugt skjal.

**Viðmerking** Hetta mál er eftir míni metan ikki eitt mál um innlit, men ein fyrispurningur, tí talan er ikki um innlit í ávíst mál ella skjal, men um at savna saman ymiskar upplýsingar fyri at kunna svara einum fyrispurningi. Av tí at innlitslógin ikki

er galdandi fyri viðgerðina av málinum, havi eg ikki viðmerking til viðgerðina, men av tí at málið av kommununi er bólkað og viðgjørt sum innlitsmál, er tað ikki tikið úr kanningini.

**<u>Mál nr. 44</u>**

Tann 19. desember 2022 bað borgari um alment innlit í skjøl og svar í sambandi við ávísa grannahoyring.
Tann 21. desember 2022 játtaði kommunan innlit í 4 skjøl. Viðmerkt varð, at 20 skjøl vórðu viðgjørd í mun til umbønina, at borgarin áður hevði fingið innlit í 16 av skjølunum og nú fekk játtað innlit í 4 ávís skjøl. Viðlagt skjølunum var skjalayvirlit, ið vísti 20 skjøl, deild upp sum tey 16, ið borgarin áður hevði fingið innlit í, og tey 4, hann nú fekk innlit í.

**Viðmerking** Hvat viðvíkur týdninginum av at upplýsa samlaða talið av skjølum í einum máli verður víst til viðmerkingar mínar til mál nr. 41.

**<u>Mál nr. 45</u>**

Tann 24. februar 2023 søkti borgari um innlit í, hvønn stuðul kommunan letur til ítróttarfeløgini, hvat grundarlagi er fyri stuðlinum, og hvør býtislykil verður brúktur.
Tann 2. mars 2023 svaraði kommunan við at upplýsa um stuðulsleistin, samlaðu játtanina til stuðul, og hvussu nógv var útlutað til stór, miðalstór og smærri feløg. Innlit var ikki givið í nakað ávíst skjal.

**Viðmerking** Hetta er eftir míni metan ein fyrispurningur og ikki eitt innlitsmál. Kommunan svaraði fyrispurninginum og gav ikki innlit í ávíst skjal. Av tí at kommunan hevur bólkað málið sum innlitsmál, er málið ikki tikið úr kanningini.

**<u>Mál nr. 46</u>**

Tann 21. februar 2022 bað borgari um innlit í øll skjøl um ætlaða Sjósavnið í Miðvági. Tann 26. apríl 2022 fekk borgarin játtað innlit í tilsamans 29 skjøl úr málinum um ætlaða Sjósavnið í Miðvági.

**Viðmerking**

Hvat viðvíkur týdninginum av at upplýsa samlaða talið av skjølum í einum máli verður víst til viðmerkingar mínar til mál nr. 41. Hvat viðvíkur viðgerðartíð verður víst til viðmerkingar mína til mál nr. 42.

**<u>Mál nr. 47</u>**

Tann 10. februar 2022 bað borgari um innlit í kostnaðin av SÍF / Ungdómshús projektinum.
Tann 17. februar 2022 sendi Vága kommuna eina uppgerð, sum vísti kostnaðin higartil at nevnda projektinum.

**Viðmerking** Talan er eftir mínum tykki um ein fyrispurning heldur enn um mál um innlit, tí skjalið, sum gevur borgaranum ynsktu upplýsingarnar, verður gjørt til høvið og innlit verður ikki givið í eitt ávíst verandi skjal í einum máli. Kommunan hevur bólkað málið sum innlitsmál, og er tað tí við í hesi kanning.

**3 síðstu málini har innlit var heilt ella partvíst játtað**

**<u>Mál nr. 48</u>**
Tann 28. februar 2022 søkti borgari um innlit í avtaluna, sum bleiv gjørd ímillum kommunurnar í Vágunum, tá tær løgdu saman, hvussu nógvur peningur var brúktur til ávís viðurskifti, og hvussu nógvur skattur kom úr bygdunum í kommununi.
Tann 21. mars 2022 svaraði kommunan, at umbønin varð partvíst noktað, at innlit kann gevast í mál og skjøl, sum kommunan hevur undir hond, og at tað ikki er endamálið við innlitslógini, at borgarar kunnu fáa kommununa at framleiða skjøl. Við støði í hesum segði kommunan, at ikki var møguligt at geva fult innlit í pkt. 2-5 í umbønini. Kommunan svaraði annars spurningunum og lat innlit í skjalið um pkt. 1, um avtaluna um samanlegging millum Miðvágs og Sandavágs kommunu.

**Viðmerking** Málið er lutvíst ein fyrispurningur og lutvíst ein umbøn um innlit. Kommunan játtar innlit í tey skjøl, sum eru fevnd av innlitsumbønini, og greiðir, sum hon skal, frá, hví hon ikki fær givið innlit í nøkur av pkt. í innlitsumbønini.

Viðgerðartíðin er 21 dagar. Í mun til innlitspartin í málinum er hetta ikki í samsvar við § 16 í innlitslógini, sí viðmerkingarnar til mál nr. 42 um 10 daga regluna.

**<u>Mál nr. 49</u>**
Tann 26. september 2022 søkti borgari um innlit í, hvat ávíst felag rindaði í leigu fyri hølir frá kommununi.
Tann 10. oktober 2022 noktaði kommunan innlit. Sum heimild fyri noktanini varð víst til § 13, stk. 5 í innlitslógini um at innlit kann avmarkast í tann mun tað er neyðugt til verju av munandi umhugsni viðv. fíggjarligu áhugamálunum hjá tí almenna, herundir fremjan av vinnuvirksemi tess almenna. Eisini skrivaði kommunan: "Tá kommunan ger eina leiguavtalu við eina fyritøku um høli, er talan um vinnuvirksemi hjá kommununi. Hetta merkir, at kommunan í hesum førinum rekur virksemi, í kapping á leigumarknaðinum, og við atliti at verja samráðingarstøðuna hjá kommununi kann innlit ikki veitast í leigukostnaðin".

**Viðmerkingar** Hvat viðvíkur viðgerðartíðini uppá 14 dagar (26. sept. - 10 okt.) verður vísti til viðmerkingarnar til mál nr. 32 um 10 daga regluna.

**<u>Mál nr. 50</u>**
Tann 3. november 2020 bað borgari um innlit í 3 ymisk mál.
Tann 5. november 2020 svaraði kommunan og játtaði innlit í tað eina málið og sendi borgaranum umbidna skjalið. Viðvíkjandi hinum báðum málunum viðmerkti kommunan, at tað var ikki nakað mál hjá kommununi um eitt av nevndu viðurskiftunum og í seinna málinum fyrilá umbidna kostnaðarmetingin ikki enn.

**Onga viðmerking**

**Viðmerking um gjald**
Vága kommuna hevur ikki kravt gjald í teimum málum, sum eru partur av kanningini.

***Samanumtikið fyri málini hjá Vága kommunu haldi eg, at játtanarskrivini eru ikki nóg neyv, tí tey geva ikki vissu fyri, at talan er um øll skjølini í málinum. Eg fari tí at mæla kommununi til at gera skrivini greiðari, so eingin ivi er um, hvussu nógv skjøl eru tilsamans í tí viðkomandi málinum, og um innlit verður latið í øll skjølini.***

***Í fleiri málum er 10 daga reglan í § 16 í innlitslógini ikki hildin. Eg fari tí at minna kommununa á, at ein innlitsumbøn skal avgreiðast sum skjótast, og er umbønin ikki svarað innan 10 dagar, skal kommunan boða umsøkjaranum frá um orsøkina til hetta, og nær ein avgerð kann væntast.***

***Nøkur av málunum, sum eru skrásett sum innlitsmál, eru heilt ella partvíst fyrispurningar. Eg fari at mæla Vága kommunu til at gera eina neyvari gjøgnumgongd av málunum við móttøku, so greitt er, um talan er um eitt innlitsmál ella fyrispurning, og at skrásetingin er hareftir. Er talan um innlitsmál eigur eisini við eini snarkanning at verða mett um, hvussu skjótt málið kann avgreiðast, so mál av lættari slag ikki bíða óneyðuga leingi.***

***Sum skilst hevur Vága kommuna ikki nakra skrivaða mannagongd fyri viðgerðina av innlitsmálum. Skrivaðar mannagongdir og møguliga tilknýtt standardskriv eru eitt gott amboð hjá umsitingini, tí hetta kann lætta um málsviðgerðina av innlitsmálum. Eg fari tí at mæla Vága kommunu til at gera skrivliga mannagongd fyri viðgerðina av innlitsmálum.***

***Einkult dømi er um, at noktandi innlit ikki verður grundgivið, men tykist hetta ikki sum ein stórur trupulleiki.***

## 5.6 Sunda kommuna

Sunda kommunu fekk 12 umbønir um alment innlit í 2022, 8 umbønir í 2021 og 19 umbønir í 2020.

*Mannagongd*
Um mannagongdina fyri viðgerð av innlitsmálum hevur kommunan greitt frá:

> "Skipan av viðgerð: Talan kann vera um skrivligar ella munnligar umbønir. Um tað eru munnligar umbønir, verður notat skrivað."
>
> Umbønirnar vera skrásettar í journalskipanina til rætta málsviðgera við røttu avgreiðslutíðarfreist.
>
> Málsviðgerin hevur ábyrgdina av, at umbønirnar vera avgreiddar sambært innlitislógini til ásettu tíðarfreistina.
>
> Tá talan er um alment innlit eftir innlitislógini verður gjald kravt
>
> Samb. kunngerð frá 1993 er gjaldið : Fyri avrit ella fotoavrit av skjølum í einum máli, ið verða latin sambært lógini um innlit í fyrisitingina, krevur viðkomandi myndugleiki 20 kr. fyri fyrstu síðuna og 1 kr. fyri hvørja byrjaða næstu síðu.
>
> Skjølini vera síðani send umsøkjara í telduposti. Kunnu eisini avheintast á kommunuskrivstovuni."

Tann 13. apríl 2023 sendi Sunda kommuna mær 5 tey síðstu játtaðu innlitsmálini og 5 tey síðstu noktaðu innlitsmálini.

**5 síðstu málini har innlit var játtað**

**Mál nr. 51**
Tann 19. mai 2022 bað borgari um innlit í øll skjøl, sum viðvíktu eini umbygging av ávísum matr. nr.
Tann 31. mai játtaði kommunan innlit í ávíst mál. Gjald uppá 31. kr. varð kravt forút og víst var til kunngerðini frá 1993. Sagt varð, at avritini vóru íalt 13 síður, og so skjótt peningurin var móttikin, skuldu skjølini sendast. Skjølini kundu eisini verða avheintað og goldin á kommunuskrivstovuni.

**Viðmerking** Í játtanarskrivinum varð sagt, at avritini vóru íalt 13 síður, men ikki hvussu nógv skjøl vóru í málinum og ikki varð víst til nakað skjalayvirlit fyri málið. Ein slík avgreiðsla gav ikki vissu fyri, at borgarin fekk øll skjøl, sum vóru í tí viðkomandi málinum. Kommunan átti at upplýst, hvussu nógv skjøl vóru í málinum

og viðlagt skjalayvirlit, har øll skjøl vóru á. Uttan hesa upplýsing hevði borgarin ongan møguleika fyri at meta um, hvørt hann fekk fult innlit ella bara partvíst innlit.

Viðgerðartíðin í hesum máli var frá 19. mai til 31. mai t.v.s. 12 dagar.
Sambært § 16, stk. 1 í innlitslógini skal ein myndugleiki sum skjótast taka støðu til, um ein umbøn um alment innlit kann verða gingin á møti. Um hetta ikki er gjørligt innan 10 dagar, skal viðkomandi hava eina fráboðan um orsøkina til hetta, og nær væntast kann, at ein avgerð fyriliggur, jbr. § 16, stk. 2 í innlitslógini. Vísandi til hetta er tað ikki nøktandi, at áheitanin slapp at liggja ósvarað í 12 dagar. Tá kommunan ikki kundi avgreiða málið innan 10 dagar, átti hon at sagt borgaranum frá orsøkini til hetta, og nær borgarin kundi vænta sær svar.

Hvat víðvíkur spurninginum um at krevja gjald forút, er tað mín meting, at hetta bert skal gerast í serligum førum. Víst verður í hesum sambandi til viðmerkingar mínar í kap. 4

<u>**Mál nr. 52**</u>
Tann 26. september 2022 bað borgari um alment innlit í listan yvir tey, sum høvdu fingið tillutað grundøki í ávísari bygd, og tey, sum ikki høvdu fingið.
Tann 29. september 2022 sendi kommunan borgaranum umbidna bíðilistan, har tilskilað varð, hvørji høvdu fingið tillutað grundøkini.

**Onga viðmerking**

<u>**Mál nr. 53**</u>
Tann 22. september 2022 bað almennur stovnur um at fáa innlit í málið/verkætlanina at skráseta staðarnøvn í Sunda kommunu.
Tann 3. november 2022 sendi kommunan stovninum skjølini í málinum.

**Viðmerking** Her er talan um almennan stovn, sum í sambandi við sítt virksemi biður annan myndugleika um upplýsingar. Eg haldi tí, at hetta málið er eitt mál um avgreiðslu eftir § 27 í fyrisitingarlogini, heldur enn eitt innlitsmál. Eg havi tí ikki viðmerkingar til avgreiðslutíðina, sum var 1 mánaður og 11 dagar.

<u>**Mál nr. 54**</u>
Tann 9. januar 2023 bað borgari um innlit í bátalistan til havnapláss í einum av bygdunum í Sunda kommunu og setti samstundis nakrar spurningar.
Tann 12. januar játtaði kommunan innlit og kunnaði um, at viðv. spurningunum, so vórðu hesir sendir víðari til avgreiðslu. Kommunan fráboðaði samstundis, at kostnaðurin fyri innlitið var 20 kr., og tá peningurin var fluttur, bleiv yvirlitið yvir bátapláss sent. Tann 16. januar 2023 sendi kommunan umbidna yvirlitið til borgaran.

**Viðmerking** Hvat víðvíkur spurninginum um at krevja gjald forút, er tað mín meting, at hetta bert skal gerast í serligum førum. Víst verður í hesum sambandi til viðmerkingar mínar í kap. 4

**<u>Mál nr. 55</u>**
Tann 17. mars 2023 bað borgari um alment innlit í tvey ávís mál.
Tann 27. mars 2023 játtaði kommunan innlit í 18 skjøl úr tí eina málinum sum viðvíkti ávísum matr. nr. og kunnaði um, at kostnaðurin var 37 kr., og tá peningurin var fluttur vórðu skjølini send. Seinni sama dag, tá rokningin var goldin, sendi kommunan skjølini til borgaran.

**Viðmerkingar** Hvat viðvíkur upplýsing um, hvussu nógv skjøl eru í viðkomandi máli verður víst til viðmerkingar mínar til mál nr. 51.

Hvat víðvíkur spurninginum um at krevja gjald forút, er tað mín meting, at hetta bert skal gerast í serligum førum. Víst verður í hesum sambandi til viðmerkingar mínar í kap. 4

**5 síðstu málini har innlit var heilt ella partvíst játtað**

**<u>Mál nr. 56</u>**
Tann 26. januar 2016 bað borgari um alment innlit í vallistan, sum lá frammi til 25. januar 2016 í sambandi við atkvøðugreiðsluna í Hósvík tann 26. januar 2016 um at leggja niður skúlan í Hósvík.
Tann 27. januar 2016 váttaði kommunan fyri móttøku av umbønini.
1. februar 2016 noktaði kommunan at lata innlit í vallistan. Víst varð til kunngerð um atkvøðugreiðslu, tá ið skúli verður lagdur niður dagf. 19. mai 2015 og løgtingslóg nr. 97 frá 15. november 2006 um val til allar føroyskar kommunur, og at vallistin lá frammi til alment eftirlit í tíðarskeiðinum 21. des. 2015 til 25. januar 2016, og at vallistin eftir hetta varð latin valstýrinum í Hósvík. Víst varð eisini til § 16 stk. 5 í lógini um val til føroyskar kommunur, har tað er ásett: ”Tað er forboðið floksskrivstovum ella øðrum miðvíst at kann eftir, um veljarar møta fram til atkvøðugreiðslu.”

**Onga viðmerking**

**<u>Mál nr. 57</u>**
Tann 29. apríl 2020 bað fjølmiðil um innlit í fundarfrásagnir frá ávísum byggifundum um nýggja felagsskúlan.

Tann 7. mai svaraði kommunan, at hon kundi ikki ganga umbønini um innlit á møti. Víst varð til § 12, stk. 1, nr. 1 í innlitslógini um privatu, herundir fíggjarligu, viðurskiftini hjá einstaklingum og § 13, stk. 1, nr. 5 um verju av fíggjarligu áhugamálum hjá tí almenna, har tað vegna serligar umstøður í hesum føri er neyðugt at dylja málið.

**Onga viðmerking**

**<u>Mál nr. 58</u>**
Tann 26. apríl 2022 bað borgari um innlit í ávíst byggimál.
Tann 4. mai 2022 svaraði kommunan, at málið ikki var viðgjørt í býráðnum, men var enn til viðgerð í umsitingini, sum skuldi fyrireika málið til víðari viðgerð. Kommunan segði, at innlit varð latið í skjølini, tá málið varð liðugt viðgjørt í býráðnum.
Tann 4. mai 2022 bað borgarin um at fáa upplýst, hvørja heimild kommunan brúkti til at nokta innlit. Tann 5. mai skrivaði kommunan, at tey høvdu kanna málið nærri og vóru komin til, at tey kundu geva innlit í partar av málinum. Vísandi til § 12 og 13 í innlitslógini viðmerkti kommunan, at tað vóru tvær tekningar, har innlit ikki varð latið, og at skjølini, sum innlit varð givið í, vóru klár til avgreiðslu. Kommunan kravdi gjald á 29 kr. og viðmerkti, at skjølini blivu send tá goldið var, og at skjølini annars eisini kundu heintast og gjaldast á kommunuskrivstovuni.

**Viðmerking** Hvat viðvíkur týdninginum av at upplýsa um, hvussu nógv skjøl eru í einum máli verður víst til viðmerkingar mínar til mál 51.

Hevur ein myndugleiki móttikið eitt skjal, sum liður í fyrisitingarligari saksviðgerð, er tað sum meginregla ikki ein treyt fyri innlitinum, at málið skal verða liðugt viðgjørt og avgjørt, áðrenn innlit kann gevast. Tá kommunan eftir nærri umhugsan játtaði partvíst innlit, havi eg ikki fleiri viðmerkingar til hesa støðu.

Vísandi til § 12 og § 13 noktaði kommunan innlit í tvær tekningar.
Eitt innlitsmál er eitt vanligt fyrisitingarligt mál. Fær borgarin ikki innlit í øll skjølini, er talan um, at kommunan partvís sýtir umbønini. Í einum slíkum føri hevur kommunan sambært §§ 21 – 23 í fyrisitingarlógini skyldu til at greiða frá, hvørji skjøl innlit ikki verður givið í, og hvør grundgevingin er fyri hesum.
Sambært skjølunum fekk borgarin bert eina ávísing til tvær lógargreinar, tá innlit varð noktað í tvær tekningar, men ikki nakra ítøkiliga grundgeving, hví innlit varð noktað. Ei heldur varð lógartilvísingin til § 12 og 13 í innlitslógini nógv greið, tí í báðum av hesum lógargreinum er talan um fleiri ymiskar støður. Noktandi avgerðin var sostatt ikki í trá við reglurnar um grundgeving í § 21-23 í fyrisitingarlógini

Hvat víðvíkur spurninginum um at krevja gjald forút, er tað mín meting, at hetta bert skal gerast í serligum førum. Víst verður í hesum sambandi til viðmerkingar mínar í kap. 4

**Mál nr. 59**
Tann 17. mars 2023 bað borgari um alment innlit í tvey ávís mál.
1. málið var um økið til framtíðarætlanir fyri havnarøki í Hósvík.
2. málið var um eina umsókn um loyvi at byggja neyst á ávísum matr. nr., og er hetta málið endurgivið í máli nr. 55.

Tann 27. mars 2023 svaraði kommunan, at málið um økið til framtíðarætlanir - planlegging havnaøki Hósvík var ikki endaliga viðgjørt í kommununi.

Kommunan játtaði partvíst innlit, og viðvíkjandi noktandi innlitinum varð víst til § 12 og 13 í innlitslógini, og at í málinum var frágreiðing um framtíðarætlan og tekning, har innlit ikki verður latið.

Kommunan kravdi forútgjalding á 46 kr.

**Viðmerking** Hvat viðvíkur upplýsing um tal av skjølum verður víst til viðmerking mína til mál nr. 51.

Tá myndugleiki arbeiðir við eini framtíðarætlan fyri eitt øki, og myndugleikin noktar innlit, tí málið ikki er endaliga viðgjørt av kommununi, eigur tað vanliga at verða víst til, at talan er enn ikki um nakað endaligt skjal. Skal væntandi viðgerðin brúkast sum grundgeving fyri noktan av innliti, er neyðugt at hava eina neyvari ávísing fyri lógarheimildini fyri noktanini.

Kommunan vísti sum grundgeving fyri at nokta innlit í eina frágreiðing um framtíðarætlan og tekning til § 12 og § 13. Hvat viðvíkur grundgeving og neyvari lógartilvísing verður í hesum sambandi víst til viðmerkingar mínar til mál 58.

Hvat víðvíkur spurninginum um at krevja gjald forút, er tað mín meting, at hetta bert skal gerast í serligum førum. Víst verður í hesum sambandi til viðmerkingar mínar í kap. 4

**Mál nr. 60**
Mál nr. 60 er tikið úr frágreiðingini, tí talan var um sama mál, sum er endurgivið í nr. 55.

**Viðmerking um gjald:** Av málunum, sum eg havi gjøgnumgingið hjá Sunda kommunu sæst, at kommunan krevur gjald fyri avgreiðslu av innliti eftir kunngerð nr. 198 frá 15. desember 1993 um gjald fyri avrit og fotoavrit eftir lógini um innlit í fyrisitingina.

Gjaldið verður kravt forút, t.e. kommunan krevur, at gjaldið er goldið, áðrenn skjølini verða send ella útflýggjaði. Hvat víðvíkur spurninginum um at krevja gjald forút, er tað mín meting, at hetta bert skal gerast í serligum førum. Víst verður í hesum sambandi til viðmerkingar mínar í kap. 4

***Samanumtikið fyri málini hjá Sunda kommunu haldi eg, at játtanarskrivini eru ikki nóg neyv, tí tey geva ikki vissu fyri, at talan er um øll skjølini í málinum. Eg fari tí at mæla kommununi til at gera skrivini greiðari, so eingin ivi er um, hvussu nógv skjøl eru tilsamans í tí viðkomandi málinum, og um innlit verður latið í øll skjølini.***

***Í fleiri málum er 10 daga reglan í § 16 í innlitslógini ikki hildin. Eg fari tí at minna kommununa á, at ein innlitsumbøn skal avgreiðast sum skjótast, og er umbønin ikki svarað innan 10 dagar, skal kommunan boða umsøkjaranum frá um orsøkina til hetta, og nær ein avgerð kann væntast.***

***Einkult dømi er um, at noktandi innlit ikki verður nóg neyvt grundgivið og manglar lógartilvísing, men tykist hetta ikki sum ein stórur trupulleiki.***

***Sum skilst hevur Sunda kommuna ikki nakra skrivaða mannagongd fyri viðgerðina av innlitsmálum. Skrivaðar mannagongdir og møguliga tilknýtt standardskriv eru eitt gott amboð hjá umsitingini, tí hetta kann lætta um málsviðgerðina av innlitsmálum. Eg fari tí at mæla Sunda kommunu at gera skrivliga mannagongd fyri viðgerðina av innlitsmálum.***

***Hvat viðvíkur gjaldi fyri at veita innlit er tað mín meting, at gjald sum meginregla ikki eigur at vera kravt sum forútgjalding, m.a. tí hetta kann seinka innlitinum. Eg fari tí at mæla til, at kommunan broytir sínar mannagongdir fyri at krevja gjald, so forútgjalding bert verður kravd, tá ein serlig orsøk er til tað. Víst verður í hesum sambandi til kap. 4, har gjaldsviðurskiftini og kunngerðin um gjald fyri innlit eru umrødd.***

## 5.7 Tvøroyrar kommuna

Tvøroyrar kommuna móttók 3 umbønir um alment innlit í 2022, 1 umbøn í 2021 og 6 umbønir í 2020.

Tann 3. apríl 2023 móttók eg 6 tey síðstu avgreiddu innlitsmálini frá kommununi, og 5. mai 2023 fekk eg eftir umbøn 4 mál afturat, so tað eru 10 mál frá Tvøroyrar kommunu, sum eru við í kanningini**.**

*Mannagongd*
Viðvíkjandi mannagongd fyri viðgerð av innlitsmálum hevur kommunan upplýst, at Tvøroyrar kommuna byrjaði at brúka journal skipanina 360 frá Formula í 2020, sum hevur innbygda skipan til handfaring av umsóknum um alment innlit.

Av skjølunum frá kommununi sæst, at kommunan hevur gjørt vegleiðing um rættin til alment innlit.

**6 tey síðstu avgreiddu málini (játtað og noktað)**

**Mál nr. 61**
Tann 5. oktober 2020 bað borgari um innlit viðvíkjandi vaktarhaldinum til Heystfagnardagin á Tvøroyri tann 3. okt. 2020.
Tann 26. oktober 2022 játtaði kommunan innlit. Viðmerkt varð, at umsitingin metti, at borgarin, sum partur av málinum, hevði rætt til skjalainnlit sambært fyrisitingarlógini. Eisini varð viðmerkt, at skjalainnlitið varð latið til lesnað, og at ikki var loyvt at endurprenta.

**Viðmerking** Av tí at kommunan hevur mett borgarin sum part í málinum, og tí viðgjørt innlitsumbønina sum partsinnlit eftir fyrisitingarlógini, geri eg ikki viðmerkingar til málið. Málið er áður viðgjørt av LUM 20/00129.

**Mál nr. 62**
Tann 7. februar 2022 bað borgari um innlit í útreiðslurnar hjá Tvøroyrar kommunu av ávísari busskoyring seinastu 6 árini og útgreinað ár fyri ár.
Tann 9. februar 2022 váttaði kommunan fyri móttøku av innlitsumbønini og kunnaði um, at umbønin varð latin víðari til borgarstjóran at viðgera og taka støðu til. Kunnað varð um reglurnar fyri almennum innliti.

Tann 18. februar 2022 boðaði kommunan frá, at vegna væntandi arbeiðsorku m.a. korona, varð sagt frá, at umbønin um innlit ikki kundi avgreiðast enn.

Tann 27. februar 2022, 29. mars 2022, 13. juni 2022, 1. mars 2023 og 5. mars 2023 sendi borgarin áminning um innlitsumbønina.

Tann 13. juni 2022 spurdi umsitingin borgarstjóran, um hann hevði svarað innlitsumbønini, og um ikki, um hann so avgreiddi hetta.

Tann 5. mars 2023 sendi kommunan soljóðandi skriv til borgaran: "Boðast skal frá, at borgarstjórin hevur heitt á umsitingina, um at lata innlit í alt tilfar, sum er journaliserað málinum, ið vísir til gongdina at bjóða skúlabarnaflutningstænastuna út í 2014, samt útskrift av debit lista 2014 - 2022 av sama. Við skrivinum var fylgiskriv um játtað innlit í 5 skjøl og skjalayvirlit úr málinum, sum vísti tey 5 skjølini.

**Viðmerking** Viðgerðartíðin í hesum máli var frá 7. februar 2022 til 5. mars. 2023 t.v.s. 1 ár og 26 dagar.

Sambært § 16, stk. 1 í innlitslógini skal ein myndugleiki sum skjótast taka støðu til, um ein umbøn um alment innlit kann verða gingin á møti. Um hetta ikki er gjørligt innan 10 dagar, skal viðkomandi hava eina fráboðan um orsøkina til hetta, og nær væntast kann, at ein avgerð fyriliggur, jbr. § 16, stk. 2 í innlitslógini. Vísandi til hetta er tað als ikki nøktandi, at áheitanin slapp at liggja ósvarað 1 ár og 26 dagar.
Tá kommunan ikki kundi avgreiða málið innan 10 dagar, átti hon at sagt borgaranum frá og greitt frá orsøkini til hetta, og eisini sagt borgaranum, nær hann kundi vænta sær svar.
Eisini átti kommunan stundisliga at hava svarað áminningum frá borgaranum.

**<u>Mál nr. 63</u>**
Tann 12. desember 2022 bað fakfelag um innlit í lønarútgjaldingarnar hjá Tvøroyrar kommunu í nov. 2022 eftir sáttmálanum millum seg og annað felag. Biðið varð um at upplýsingarnir vórðu settir upp eftir stigi, ársverk, løn og eftirløn.
Tann 17. januar 2023 sendi kommunan felagnum eitt til høvi framleitt yvirlit sum svaraði spurningunum hjá felagnum. Einki sjálvstøðugt skjal varð sent.

**Viðmerking** Hetta mál er eftir míni metan ikki eitt mál um innlit, men ein fyrispurningur, tí talan er ikki um innlit í ávíst mál ella skjal, men um at savna saman ymiskar upplýsingar fyri at kunna svara einum fyrispurningi. Tá innlitslógin ikki er galdandi fyri viðgerðina av málinum, havi eg ikki viðmerking til viðgerðina, men av tí at málið av kommununi er bólkað og viðgjørt sum innlitsmál, er tað ikki tikið úr kanningini.

**<u>Mál nr. 64</u>**
Tann 3. januar 2023 søkt ein fjølmiðil um alment innlit í umsóknina hjá Varðanum Pelagic um byggiloyvi til protein- og lýsiverksmiðju og tekningar av ætlanini.

Tann 5. januar 2023 váttaði kommunan fyri móttøku av umbønini, og at fjølmiðilin skuldi frætta aftur, tá málið var liðugt viðgjørt við atliti at § 12 stk. 2 í innlitslógini (tøkniligar útbúningar ella mannagongdir, ella rakstrar – ella vinnuviðurskifti ..við stórum fíggjarligum týdningi fyri viðkomandi virki).
Kommunan kunnaði eisini um ætlaðan borgarafund 24. januar, har felagið fór at greiðu frá byggiætlanini og høvi fór at verða at seta spurningar.
Kommunan hevur yvirfyri mær viðmerkt, at hon eftirfylgjandi metir, at allir spurningar hesum viðv. vórðu svaraðir á almenna borgarafundinum í Salt 24. januar 2023.

**Viðmerking** Tá søkt er um alment innlit, eigur kommunan at taka støðu til um innlit kann latast ella ikki í tey skjøl, hon hevur um hendi, um málið. At sleppa sær undan at lata alment innlit við at vísa til komandi almennan fund, er ikki ein innlitsháttur, sum fylgir reglunum í lógini um alment innlit.

Mál 64 og 65 tykjast at viðvíkja somu viðurskiftum. Tískil undrar tað meg, at kommunan í máli 64 ikki veitur skjalainnlit, men bert vísur til komandi borgarafund, meðan umsøkjarin í máli 65 fær játtað partvíst skjalainnlit og kunning um komandi borgarafund. Eg skal tí minna kommununa á líkaregluna, og at hon eisini er galdandi fyri hesi mál.

**<u>Mál nr. 65</u>**
Tann 5. januar 2023 søkti felag um innlit í verkætlanina um nýggja protein og lýsiverksmiðju hjá Varðanum Pelagic.
Tann 13. januar svaraði kommunan, at kommunan lat partvíst innlit í umsóknina hjá Varðanum Pelagic um byggiloyvi til protein- og lýsiverksmiðju á Tvøroyri, og at umsóknin “fyribils” taldi 21 A4 síður, har kommunan avgjørdi “fyribils” at geva innlit í tríggjar tær fyrstu síðurnar av umsóknini, ið lýsa ætlanina hjá Varðanum Pelagic at byggja protein- og lýsiverksmiðju á Tvøroyri. Kommunan segði, at avgjørt var ikki at lata innlit í tekningar, sum eru at meta at innihalda tekniskar upplýsingar, ið umsitingin hevur tørv á at kanna nærri, áðrenn innlit verður latið í hesi skjøl, men at innlit verður latið í restandi skjøl, skjótast gjørligt.

Upplýst varð, at borgarafundur fór at verða 24. jan. 2023, har Tvøroyrar kommuna og Varðin Pelagic skuldu greiða nærri frá um ætlanina at byggja protein- og lýsiverksmiðju á Tvøroyri, og at øll skuldu fáa møguleika at fáa orðið, og um ynskiligt, at seta spurningar til verkætlanina.

Kommunan hevur yvirfyri mær viðmerkt, at hon eftirfylgjandi metir, at allir spurningar hesum viðv. vórðu svaraðir á almenna borgarafundinum í SALT 24. januar 2023.

**Viðmerking** Eitt innlitsmál er eitt vanligt fyrisitingarligt mál. Fær borgarin ikki innlit í øll skjølini, er talan um, at kommunan partvís sýtir umbønini. Í einum slíkum føri hevur kommunan sambært §§ 21 – 23 í fyrisitingarlógini skyldu til at greiða frá, hvørji skjøl, innlit ikki verður givið í, og hvør grundgevingin er fyri hesum.
Sambært skjølunum varð noktað innlit í ávís skjøl. Grundgivið varð fyri noktanini, men var ikki, sum tað átti, víst til viðkomandi lógarheimildina fyri at nokta innlit jbr. reglurnar um grundgeving í § 21-23 í fyrisitingarlógini.

**<u>Mál nr. 66</u>**
Tann 19. januar 2023 bað fjølmiðil um innlit í útreiðslurnar hjá kommununi í sambandi við ávísa ferð hjá býráðnum.
Tann 13. februar 2023 játtaði kommunan innlit í 6 skjøl í málinum. Viðmerkt varð, at skjølini vístu allar ferðaútreiðslurnar av viðkomandi ferð.

**Viðmerking** Sambært § 16, stk. 1 í innlitslógini skal ein myndugleiki sum skjótast taka støðu til, um ein umbøn um alment innlit kann verða gingin á møti. Um hetta ikki er gjørligt innan 10 dagar, skal viðkomandi hava eina fráboðan um orsøkina til hetta, og nær væntast kann, at ein avgerð fyriliggur, jbr. § 16, stk. 2 í innlitslógini. Vísandi til hetta er tað ikki nøktandi, at áheitanin slapp at liggja ósvarað í 25 dagar. Tá kommunan ikki kundi avgreiða málið innan 10 dagar, átti kommunan at sagt borgaranum frá hesum, hví og nær borgarin kundi vænta sær svar. Eisini átti kommunan stundisliga at hava svarað áminningum frá borgaranum.

Í innlitsjáttanini varð ikki upplýst, hvussu nógv skjøl tilsamans vóru í málinum, men bert at játtað varð innlit í 6 skjøl, ið vóru í málinum. Ein slík avgreiðsla gevur ikki vissu fyri, at borgarin fekk øll skjøl, sum vóru í tí viðkomandi málinum. Kommunan átti at upplýst, hvussu nógv skjøl vóru í málinum og viðlagt skjalayvirlit, har øll skjøl vóru á. Uttan hesa upplýsing hevði borgarin ongan møguleika fyri at meta um, hvørt hann fekk fult innlit ella bara partvíst innlit.

**Tey 4 seinni innsendu málini (játtað og noktað)**

**<u>Mál nr. 67</u>**
Tann 8. februar 2021 bað borgari um innlit í øll skjøl viðv. útbjóðing av kantinuni í Trongisvági.
Tann 15. februar 2021 játtaði kommunan partsinnlit sambært fyrisitingarlógini § 9.

**Viðmerkingar** Av tí at málið er viðgjørt sum mál um partsinnlit sambært fyrisitingarlógini og ikki sum mál um alment innlit, geri eg ikki viðmerkingar til málið. Kommunan kravdi gjald á 27 kr. Málið er áður viðgjørt av LUM 21/01917.

**Mál nr. 68**

Tann 30. september 2020 bað advokatur vegna klient um innlit í ávíst mál hjá Suðuroyar barnaverndartænastu um barn hjá klientinum.
Tann 15. oktober 2020 svaraði kommunan:

> "Vísandi til m.a. Løgtingslóg um viðgerð av persónsupplýsingum, sum broytt við løgtingslóg nr. 24 frá 17. mai 2004. - Undantøk frá rættinum til innlit og kunning § 22. Ásetingarnar í §§ 18 og 19 um innlit og § 20, stk. 1, og § 21, stk. 1, um upplýsingarskyldu fevna ikki um persónsupplýsingar, sum, stk. 4. eru fevndar av tagnarskyldu, ásett í lóg. Tvøroyrar kommuna útflýggjar ikki persóns upplýsingar til 3 persón, uttan at skjalprógva er fyri rættin til hesar upplýsingar. Áðrenn umsitingin hjá Tvøroyrar kommunu kann viðgera máli, verður biðið um skjalprógv fyri, at tín klientur ... hevur rættindi til at fáa útflýggja upplýsingar frá Tvøroyrar kommunu viðv. ...
> Eisini verður víst til Løgtingslóg um barnavernd, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 93 frá 6. juni 2017 (Barnaverndarlógin), við tað at ...sostatt talan um eitt mál undir barnaverndarlógini."

Málið varð síðani sent til Suðuroyar barnaverndartænastu, sum tók sær av málinum

**Viðmerking** Av tí at talan eftir mínum tykki ikki er um mál um alment innlit, geri eg ikki viðmerkingar til málið.

**Mál nr. 69**

Tann 16. juli 2020 bað borgari um innlit í bíðilistan til bátapláss á Tvøroyri, tvs, hvør eigur bátaplássini í teimum báðum hyljunum, og hvussu bíðilistin sær út.
Tann 4. august 2020 svaraði kommunan, at Tvøroyrar kommuna er eigari av øllum bátaplássunum, og fyrispurningur um bíðilistan varð sendur til Tvøroyrar Havn til nærri greinan. Víst var síðani til svarið frá Havnarmeistaranum.

**Viðmerking:** Hetta mál er eftir míni metan ein fyrispurningur og ikki eitt innlitsmál. Kommunan hevur heldur ikki viðgjørt tað eftir lógini um alment innlit og givið innlit í avíst skjal ella mál, men givið svar uppá spurningarnar. Eg geri tí ikki nakrar viðmerkingar til viðgerðina.

**Mál nr. 70**

Tann 4. februar 2020 bað borgari um innlit í starvsetanina av nýggjum átaksleiðara.
Tann 10. februar 2020 svaraði kommunan:

> "Sí viðhefta svarskriv, uppá tín teldupost dagf. hin 4. februar 2020, -stílaður til Tvøroyrar kommunu-, har biðið verður um innlit í starvssetanina av "Átaksleiðara" –Tilbúgvingarleiðara-, við grundgevingini um, at tygum vóru ein av umsøkjarunum, sum ikki fekk starvið.

> Tvøroyrar kommuna hevur, tann 13. september 2019, sent tygum bræv, við fráboðan um, at býráðið, eftir tilmæli frá setanarnevndini, hevur avgjørt, at seta annan umsøkjara í starvið sum tilbúgvingarleiðari. ...
>
> Og vísandi til fyrisitingarlógina og lógina um alment innlit, verður av umsitingini hjá Tvøroyrar kommunu staðfest, at m.a. mál viðv. starvssetan og flytan av starvsfólkum í hægri starv, ikki eru fevnd av lógini um alment innlit, jbr. § 2, stk. 1 í innlitslógini.
> Umsitingin hjá Tvøroyrar kommuna metur sostatt, at tygum hava fingið allar neyðugar upplýsingar, sum kunnu útflýggjast í málsviðgerðini av setanini av tilbúgvingarleiðara, og verður málið harvið mett liðugt viðgjørt av Tvøroyrar kommunu.“

**Viðmerking** Sambært § 2 stk. 1 er tað bert ásetingin um notatskyldu í § 6 í innlitslógini, sum er galdandi fyri setanarmál. Útgangsstøðið er tí, at innlit í setanarmál ikki verður givið eftir lógini um alment innlit. Sum skilst var í hesum føri talan um ein av umsøkjarunum, og at hesin hevði fingið partsinnlit eftir reglunum í fyrisitingarlógini.

**Viðvíkjandi gjaldi:** Tvøroyrar kommuna hevur kravt gjald í einum av teimum málunum, sum eru við í kanningini.

***Samanumtikið fyri málini hjá Tvøroyrar kommunu haldi eg, at játtanarskrivini eru ikki nóg neyv, tí tey geva ikki vissu fyri, at talan er um øll skjølini í málinum. Eg fari tí at mæla kommununi til at gera skrivini greiðari, so eingin óvissa er um, hvussu nógv skjøl eru tilsamans í tí viðkomandi málinum, og um innlit verður latið í øll skjølini.***

***Í fleiri málum er 10 daga reglan í § 16 í innlitslógini ikki hildin og í einum máli er viðgerðartíðin meir enn 1 ár. Eg fari tí at minna kommununa á, at ein innlitsumbøn skal avgreiðast sum skjótast, og er umbønin ikki svarað innan 10 dagar, skal kommunan boða umsøkjaranum frá um orsøkina til hetta, og nær ein avgerð kann væntast.***

***Skjølini í onkrum av málunum, eg havi móttikið, vísa, at málini eru viðgjørd sum partsinnlit. Hesi mál verða viðgjørd eftir fyrisitingarlógini og ikki eftir innlitslógini. Best er um kommunan longu í sambandi við móttøku og skráseting av innlitsumsóknum hugsar um at skilja millum alment innlit og partsinnlit.***

***Tá søkt er um alment innlit, eigur kommunan at taka støðu til, um innlit kann latast ella ikki í tey skjøl, hon hevur um hendi, um málið. Kommunan hevur í***

***tveimum málum heilt ella partvíst komið sær undan at lata alment innlit við at vísa til komandi almennan fund. Eg fari tí at minna kommununa á, at ein innlitsumbøn skal avgreiðast við at játta ella nokta innlit í tey viðkomandi skjølini.***

***Dømi er um, at noktandi innlit ikki verður nóg neyvt grundgivið og manglar lógartilvísing, men tykist hetta ikki sum ein stórur trupulleiki.***

***Tvøroyrar kommuna hevur gjørt vegleiðing / kunningarfaldara um viðgerðina av innlitsmálum.***

## 5.8 Fuglafjarðar kommuna

Fuglafjarðar kommuna móttók 3 umbønir um alment innlit í 2022, 12 umbønir í 2021 og 13 umbønir í 2020.

Tann 24. apríl 2023 fekk eg 6 innlitsmál frá kommununi og seinni fekk eg eftir umbøn 4 afturat, so 10 mál frá Fuglafjarðar kommunu eru við í kanningini.

*Mannagongd*
Kommunan hevur greitt frá, at hon hevur hesa mannagongd fyri viðgerð av innlitsmálum:

“Tá innlitsmál kemur til Fuglafjarðar kommunu við posti ella telduposti verður umsóknin viðgjørt soleiðis:

1. Umsókn verður skrásett í journalskipanina til rætta viðkomandi
2. Móttøkuváttan verður sent til sendaran
3. Umsóknin verður viðgjørd skjótast tilber, og innan 10 dagar samb. Lóg um alment innlit
4. Um ikki ber til at svara innan tíðarfreistina, so verður biðið um longda freist, skriv verður sent til móttakaran
5. Tá málið er liðugt avgreitt, verður tað sent til móttakaran.”

**5 síðstu málini har innlit var játtað**

**<u>Mál nr. 71</u>**
Tann 31. august 2021 søkti borgari um innlit í ávís skjøl í einum máli.
Tann 31. august 2021 játtaði kommunan innlit og sendi umbidnu skjølini.

**Onga viðmerking**

**<u>Mál nr. 72</u>**
Tann 15. oktober 2021 bað eitt felag um innlit í ávíst mál og setti í hesum sambandi 5 spurningar.
Sama dag sendi kommunan móttøkuváttan og kunnaði um 10 daga regluna í § 16 í innlitslógini.
Tann 25. oktober 2021 játtaði kommunan innlit í 3 skjøl, sum samstundis svaraðu spurningunum frá borgaranum.

**Viðmerking** Talan er um mál sum bæði inniheldur innlitsumbøn og spurningar. Kommunan hevur í hesum sambandi svarað spurningunum og givið innlit í trý skjøl.

Í játtanarskrivinum varð sagt, at innlit bleiv játtað í viðfestu skjøl, sum vóru tey trý eyðmerktu skjølini. Ongar upplýsingar vóru um, at tey trý skjølini vóru øll skjølini í málinum, og ikki varð víst til nakað skjalayvirlit fyri málið.
Ein slík avgreiðsla vísur ikki borgaranum, um hann fekk øll skjølini, sum vóru í tí viðkomandi málinum. Kommunan átti at upplýst, hvussu nógv skjøl vóru í málinum og viðlagt skjalayvirlit, har øll skjøl vóru á. Uttan hesa upplýsing hevði borgarin ongan møguleika fyri at meta um, hvørt hann fekk fult innlit ella bara partvíst innlit.

**<u>Mál nr. 73</u>**
Tann 28. januar 2022 bað eitt felag um innlit í eitt mál um broyting av byggisamtyktini fyri bryggjuna. Víst varð til mótmælisskriv um ætlanina.
Sama dag sendi kommunan móttøkuváttan og greiddi frá 10 daga regluni í § 16 í innlitslógini.

Tann 3. februar 2022 játtaði kommunan innlit í mótmælisskrivið.

**Onga viðmerking**

**<u>Mál nr. 74</u>**
Tann 30. juni 2022 bað borgari um innlit í ávíst mál hjá foreldrum sínum og setti samstundis nakrar spurningar.
Tann 13. juli 2022 játtaði kommunan innlit í viðkomandi mál. Á skjalinum sæst, at kommunan viðmerkti, at borgarin hevur fingið partsinnlit.

**Viðmerkingar** Kommunan hevur avgreitt málið sum eitt mál um partsinnlit eftir fyrisitingarlógini og ikki sum mál um alment innlit eftir innlitslógini. Eg geri tí ikki viðmerkingar til viðgerðina.

**<u>Mál nr. 75</u>**
Tann 21. desember 2022 søkti ein fjølmiðil um innlit í rokningar í sambandi við mál um loðs. Greitt varð nærri frá, hvat málið snúði seg um. Sama dag váttaði kommunan fyri móttøku av innlitsumbønini og kunnaði um, at umbønin var skrásett. Kommunan upplýsti eisini, at vegna jolafrí kundi væntast, at umbønin ikki varð svarað fyrr enn eftir nýggjár.
Tann 4. januar 2023 sendi kommunan skriv (dagf. 2. januar), har kommunan upplýsti, hvørjar útreiðslur kommunan hevði havt av málinum.

**Viðmerking** Kommunan gav ikki innlit í nakað ávíst skjal, men svaraði innlitsumbønini við at upplýsa um tær rokningar, ið innlit varð søkt í. Tá talan er um innlitsmál, er tað eitt skjal ella mál, sum kommunan átti at givið innlit í heldur enn at viðgjørt málið sum ein fyrispurning.

Viðgerðartíðin var 14 dagar, frá 21. desember 2022 til 4. januar 2023. Sambært § 16, stk. 1 í innlitslógini skal ein myndugleiki sum skjótast taka støðu til, um ein umbøn um alment innlit kann verða gingin á møti. Um hetta ikki er gjørligt innan 10 dagar, skal viðkomandi hava eina fráboðan um orsøkina til hetta, og nær væntast kann, at ein avgerð fyriliggur, jbr. § 16, stk. 2 í innlitslógini.

Í hesum føri kunnaði kommunan beinanvegin um, at viðgerðin møguliga bleiv seinkað vegna jólafrí hjá starvsfólkum, og at svar kundi væntast eftir nýggjar. Umbønin varð síðani svarað beint eftir nýggjar.

**5 síðstu málini har innlit var heilt ella partvíst noktað**

**<u>Mál nr. 76</u>**
Tann 31. desember 2020 bað borgari um innlit í tekningar av ætlaðu keibyggingini hjá Havsbrún og í tekning av ætlaðu siloum og tilhoyrandi bygningi.
Tann 4. januar 2021 svaraði kommunan, at málið var ikki liðugt viðgjørt, og at kommunan tí metti, at ikki bar til at geva alment innlit í byggimálið. Viðmerkt varð, at tá byggimálið var liðugt viðgjørt, so kundi viðkomandi søkja av nýggjum.

**Viðmerking** Hevur ein myndugleiki móttikið eitt skjal, sum liður í fyrisitingarligari saksviðgerð hjá myndugleikanum, er tað sum meginregla ikki ein treyt fyri innlitinum, at alt málið skal verða liðugt viðgjørt, áðrenn innlit kann gevast.

Eitt innlitsmál er eitt vanligt fyrisitingarligt mál. Fær borgarin ikki innlit í øll skjølini, er talan um, at kommunan partvís sýtir umbønini. Í einum slíkum føri hevur kommunan sambært §§ 21 – 23 í fyrisitingarlógini skyldu til at greiða frá, hvørji skjøl innlit ikki verður givið í, og hvør grundgevingin og lógarheimildin er fyri hesum.

**<u>Mál nr. 77</u>**
Tann 4. januar 2021 bað ein fjølmiðil um innlit í byggifundirnar, sum høvdu verið í sambandi við skúlabyggingina í Fuglafirði.
Sama dag svaraði kommunan: "Byggimálið er ikki liðugt enn, og tí metir Fuglafjarðar kommuna, at ikki ber til at geva alment innlit í byggifundir. ...er vælkomið til at biðja um alment innlit í byggifundirnar, tá byggingin av nýggja skúlanum er liðug."

**Viðmerking** víst verður til viðmerkingarnar til mál nr. 76.

**<u>Mál nr. 78</u>**
Tann 8. mars 2023 bað borgari um at fáa roknskapin fyri Fuglafjarðar havn fyri 2020, tølini fyri partafelagsskatting útgreinað fyri 2020, og um fóðurbryggjan er endaliga samtykt, so eina tekning av hesum.

Sama dag svaraði kommunan m.a.:

> “1) roknskapurin fyri Fuglafjarðar havn 2020 er ikki grannskoðaður enn, men verður grannskoðaður í næstum, og skal verða endaliga samtyktur av Fuglafjarðar býráð áðrenn 1. juni 2021
> 2) Fyribils tølini fyri partafelagsskattin í 2020 er kr. 17.202.648. Endaliga uppgerðin yvir partafelagsskattin, sum verður avroknaður til FK fyri 2020, er tøk seinni í ár.
> 3) Málið um fóðurkaiina er ikki liðugt, men tygum hava møguleika at síggja eina tekning av fóðurbryggjuni í tí máli, sum tekniska deild hjá FK hevur um hendi.
> Vónandi er tygara umbidna almenna innlit svara á nøktandi hátt.”

Eingin skjøl vóru send við svarinum

**Viðmerking** Eitt innlitsmál er eitt vanligt fyrisitingarligt mál. Fær borgarin ikki innlit í eitt mál ella øll skjølini, sum søkt er um, er talan um eina noktandi avgerð. Í einum slíkum føri hevur kommunan sambært §§ 21 – 23 í fyrisitingarlógini skyldu til at greiða frá, hvørji skjøl/mál innlit ikki verður givið í, og hvør grundgevingin er fyri hesum.

Í hesum máli grundgav kommunan fyri, hví hon ikki lat innlit í skjølini í pkt. 1 og 2, - og lat partvíst innlit, við at svara uppá pkt. 2. Kommunan burdi eisini at hava víst til lógarheimildina fyri sýtanina.

Viðmerkjast skal, at hevur ein myndugleiki móttikið ella gjørt eitt skjal, sum liður í fyrisitingarligari saksviðgerð hjá myndugleikanum, er tað sum meginregla ikki ein treyt fyri innlitinum, at alt málið skal verða liðugt viðgjørt og avgjørt, áðrenn innlit kann gevast.

Viðv. pkt. 3, Eg havi onga viðmerking til at kommunan ístaðin fyri at senda borgaranum skjøl ella at nokta innlit, bjóðaði borgaranum samsvarandi § 16 stk. 1 í innlitslógini at koma á skrivstovuna at síggja ávís skjøl.

**<u>Mál nr. 79</u>**

Tann 16. mars 2021 bað advokatur um innlit í, hvørjar avtalur kommunan hevði gjørt við feløg og persónar í sambandi við ávísa verkætlan, og spurdi samstundis, hvørjar upphæddir kommunan hevði rindað til feløg og persónar í sambandi við nevndu verkætlan.
Kommunan sendi móttøkuváttan sama dag.
Tann 25. mars 2021 gav kommunan innlit í fýra skjøl og viðmerkti, at kommunan hevði enn ikki rindað nakra upphædd til feløg ella persónar við tilknýti til verkætlanina.

**Viðmerking** Málið er ein blanding av innlitsumbøn og fyrispurningi. Hvat viðvíkur innlitspartinum varð innlit játtað í 4 skjøl, sum svara innlitsumbønini.

**<u>Mál nr. 80</u>**
Tann 20. apríl 2021 bað eitt felag um alment innlit í ávíst byggiloyvi, klagu og svar um málið.
Tann 23. apríl 2021 sendi kommunan felagnum skjølini í tí viðkomandi klagumálinum. Sum skilst vóru hetta øll skjølini um byggiloyvið og kærumálið.

**Onga viðmerking**

**Hvat viðvíkur gjaldi:** Í teimum málum eg havi gjøgnumgingið, hevur Fuglafjarðar kommuna ikki kravt gjald fyri avgreiðsluna av innlitsumbønini.

***Samanumtikið fyri málini hjá Fuglafjarðar kommunu haldi eg, at játtanarskrivini eru ikki nóg neyv, tí tey geva ikki vissu fyri, at talan er um øll skjølini í málinum. Eg fari tí at mæla kommununi til at gera skrivini greiðari, so eingin óvissa er um, hvussu nógv skjøl eru tilsamans í tí viðkomandi málinum, og um innlit verður latið í øll skjølini.***

***Í nøkrum málum er 10 daga reglan í § 16 í innlitslógini ikki hildin. Eg fari tí at minna kommuna á, at ein innlitsumbøn skal avgreiðast sum skjótast, og er umbønin ikki svarað innan 10 dagar, skal kommunan boða umsøkjaranum frá um orsøkina til hetta, og nær ein avgerð kann væntast.***

***Fuglafjarðar kommunan hevur í onkrum føri noktað innlit við tí grundgeving, at at málið er ikki liðugt viðgjørt. Eg havi í hesum sambandi gjørt vart við, at hevur ein myndugleiki móttikið ella gjørt eitt skjal, sum liður í fyrisitingarligari saksviðgerð, er tað sum meginregla ikki ein treyt fyri innlitinum, at alt málið skal verða liðugt viðgjørt og avgjørt, áðrenn innlit kann gevast. Er talan hinvegin um ávíst skjal, sum ikki er liðugt, verður hetta mett sum innanhýsis skjal, sum í útgangsstøði er undantikið innliti.***

***Skjølini í onkrum av málunum, eg havi móttikið, vísa, at málini eru viðgjørd sum partsinnlit. Hesi mál verða viðgjørd eftir fyrisitingarlógini og ikki eftir innlitslógini. Best er um kommunan longu í sambandi við móttøku og skráseting av innlitsumsóknunum hugsar um at skilja millum alment innlit og partsinnlit. Eisini eigur at vera skilt ímillum fyrispurningar og innlitsmál.***

***Fuglafjarðar kommuna hevur gjørt mannagongd fyri viðgerð av innlitsmálum.***

## 5.9 Nes kommuna

Nes kommunu hevur bert fingið 5 umbønir um innlit síðani 2017.

Nes kommuna hevur greitt soleiðis frá um innlitsmál og mannagongdina fyri viðgerð av innlitsmálum:

> " ... Nes kommuna fær sera fáar innlitsumbønir og hevur bert fingið 5 umbønir síðan 2017. Tað verður altíð arbeitt við at halda 10 dagar freistina, men í tveimum førum hava umsøkjarar fingið boð um, at freistin ikki kann haldast.
> ...
> Ongin innlitsumbøn er noktað seinastu nógvu árini. Tó er ein at teimum 5 seinastu innlitsumbønunum partvís noktað ... Fyrisitingin saman við borgarstjóranum tekur sær av at viðgera og at svara innlitsumbønunum."

**5 síðstu málini hjá Nes kommunu**

**<u>Mál nr. 81</u>**
Tann 13. august 2017 søkti borgari um innlit í ávíst mál um asfaltering av nøkrum vegum í Nes kommunu og setti í hesum sambandi nakrar spurningar til kommununa. Tann 17. august 2017 svaraði kommunan, at tað var ættiliga umfatandi arbeiði at skula leita søgulig skjøl fram viðvíkjandi asfaltering av kommunuvegnum framvið borgarans øki, og at hetta arbeiðið kravdi nakað væl av tíð. Sagt varð frá, at kommunan arbeiddi við málinum, og at svar varð sent borgaranum skjótast gjørligt. Tann 2. oktober 2017 send kommunan svarskriv, har kommunan svaraði uppá spurningarnar frá borgaranum og læt borgaranum tey viðkomandi skjølini.

**Viðmerking** Sambært § 16, stk. 1 í innlitslógini skal ein myndugleiki sum skjótast taka støðu til, um ein umbøn um alment innlit kann verða gingin á møti. Um hetta ikki er gjørligt innan 10 dagar, skal viðkomandi hava eina fráboðan um orsøkina til hetta, og nær væntast kann, at ein avgerð fyriliggur, jbr. § 16, stk. 2 í innlitslógini. Tá kommunan kunnaði um seinkaða avgreiðslu, átti kommunan eisini at mett um, nær borgarin kundi vænta sær svar uppá innlitsumbønina.

**<u>Mál nr. 82</u>**
Tann 26. februar 2018 søkti advokatur um alment innlit í matrikulering og sølu av ávísum matrikli.
27. februar 2018 váttaði kommunan fyri móttøku av innlitsumbønini.
Tann 2. mars 2018 sendi kommunan umbidnu skjølini. Viðmerkt varð, at kommunan ikki var eigari av ognini, men var farin í eina tilgongd at ogna sær lendið. Viðlagt var eitt yvirlit yvir útflýggjaðu skjølini. 18. mars 2018 minti advokaturin á málið. Tann

22. mars 2021 svaraði kommunan, at tilfarið, sum var sent 2. mars 2018, varð sent einaferð enn. Onkur misskiljing var sostatt í samskiftinum.

**Viðmerking** Tá innlit verður játtað í ávíst mál, eigur altíð at verða tilskilað, hvussu nógv skjøl eru í málinum, og hvussu nógv skjøl innlit verður játtað í. Eisini er best um avrit av skjalayvirlitinum í málinum er viðlagt. Á hendan hátt fær borgarin vissu fyri, um hann veruliga hevur fingið innlit í øll umbiðin skjøl ella ikki.

**Mál nr. 83**

Tann 30. september 2021 bað borgari um innlit í mál viðv. grundstykkjum.
Tann 4. oktober 2021 játtaði kommunan innlit í 40 skjøl, sum áður var givið innlit í, og 20 skjøl merkt. 41 – 61 og 29 skjøl merkt 62 – 91.

**Viðmerking** Av skjølunum sæst ikki, um talan er um eitt mál ella fleiri mál, og um innlit er givið í øll skjøl í hesum málum. Víst verður til viðmerking mína til mál nr. 82 um at upplýsa, hvussu nógv skjøl eru í málinum, og at leggja við avrit av skjalayvirlitinum úr málinum.

**Mál nr. 84**

Tann 27. januar 2022 bað borgari um innlit í leigumál hjá kommununi á havnarøkinum. Borgarin ynskti at fáa upplýst navn á leigumáli (leigara), hvat leigan var og kort yvir leiguøkið.
Tann 14. februar 2022 svaraði kommunan við at vísa til viðheft yvirlit yvir leiga øki á havnarlagnum og prísyvirlitið yvir bátapláss hjá Nes kommunu. Samstundis bleiv upplýst um prísirnar fyri leiguøkið. Viðmerkt varð, at kommunan ikki gav nærri upplýsingar um hvønn einstakan leigara, tí mett varð, at tað var í stríð við § 12 í innlitslógini**.**

**Viðmerking** Málið er partvíst ein innlitsumbøn og partvís fyrispurningur. Kommunan hevur eisini avgreitt málið við partvíst at svara fyrispurningunum og at lata innlit í viðkomandi skjøl. Hvat viðvíkur tal av skjølum og skjalayvirlit verður víst til viðmerkingar mínar til mál 82.

Viðgerðartíðin var 18 dagar, frá 27. januar 2022 til 14. februar 2023. Sambært § 16, stk. 1 í innlitslógini skal ein myndugleiki sum skjótast taka støðu til, um ein umbøn um alment innlit kann verða gingin á møti. Um hetta ikki er gjørligt innan 10 dagar, skal viðkomandi hava eina fráboðan um orsøkina til hetta, og nær væntast kann, at ein avgerð fyriliggur, jbr. § 16, stk. 2 í innlitslógini. Vísandi til hetta er tað ikki nøktandi, at áheitanin slapp at liggja ósvarað í 18 dagar. Tá kommunan ikki kundi avgreiða málið innan 10 dagar, átti hon at sagt borgaranum frá og greitt frá orsøkini til hetta, og eisini sagt borgaranum, nær hann kundi vænta sær svar. Sambært kommununi fekk borgarin munnliga fráboðan um, at 10 daga reglan ikki kundi

yvirhaldast vegna sjúkramelding, men tíverri fyriliggur onki skrivligt notat, sum skjalfestir boðini.

**<u>Mál nr. 85</u>**
Tann 23. juni 2022 bað borgari um alment innlit í ávíst mál.
Tann 30. juni 2022 játtaði kommunan innlit í skjølini í sambandi við aktuella málið umframt skjøl í sambandi við annað mál. Við játtanini lá yvirlit yvir útflýggjaðu skjølini.

**Viðmerking** Av svarskrivinum hjá kommununi sást ikki, at tá innlit varð játtað, var talan um øll skjølini í tí viðkomandi málinum. Viðvíkjandi upplýsing um tal av skjølum og skjalayvirlit verður víst til viðmerking mína til mál nr. 82.

**Gjald:** Í teimum málum eg havi gjøgnumgingið, hevur Nes kommuna ikki kravt gjald í sambandi við avgreiðslu av innlitsumbønum.

***Samanumtikið fyri málini hjá Nes kommunu haldi eg, at játtanarskrivini eru ikki nóg neyv, tí tey geva ikki vissu fyri, at talan er um øll skjølini í málinum. Eg fari tí at mæla kommununi til at gera skrivini greiðari, so eingin ivi er um, hvussu nógv skjøl eru tilsamans í tí viðkomandi málinum, og um innlit verður latið í øll skjølini.***

***Í onkrum málum er 10 daga reglan í § 16 í innlitslógini ikki hildin. Eg fari tí at minna kommununa á, at ein innlitsumbøn skal avgreiðast sum skjótast, og er umbønin ikki svarað innan 10 dagar, skal kommunan boða umsøkjaranum frá um orsøkina til hetta, og nær ein avgerð kann væntast.***

***Sum skilst hevur Nes kommuna ikki nakra skrivaða mannagongd fyri viðgerðina av innlitsmálum. Skrivaðar mannagongdir og møguliga tilknýtt standardskriv eru eitt gott amboð hjá umsitingini, tí hetta kann lætta um málsviðgerðina av innlitsmálum. Eg fari tí at mæla Nes kommunu til at gera skrivliga mannagongd fyri viðgerðina av innlitsmálum.***